2028
2027
2026
2025
2024
2023
2022
2021
2020
2019
2018
2017

# Sjálvbjargnar, samhaldsfastar & tíðarhóskandi Føroyar

Fíggjarmálaráðið

## Búskaparfrágreiðing I

mars 2016

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

# Innihald

**Uppskot til samtyktar um játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2017 ... 3**

**Inngangur ... 10**

**Lýsing av gongdini í búskapinum ... 11**

*Framgongdin tók dik á seg seinnu helvt av 2015 ... 12*

*Gongdin á arbeiðsmarknaðinum ... 15*

*Húsarhaldsnýtsla og eftirspurningur ... 16*

*Gongdin í brúkaraprísum ... 17*

*Gongdin í fólkatalinum ... 17*

*Viðskifti við útlond, handils- og gjaldsjavni ... 20*

*Heimsbúskapurin ... 21*

**Almenn fíggjarmál ... 24**

**Uppskotið til játtanarkarmar ... 27**

*Uppskotið til játtanarkarmar býtt á greinar ... 28*

*Rakstrarkarmar fyri § 1 Løgtingið 2017-2021 ... 28*

*Rakstrarkarmar fyri § 2 Løgmansfyrisitingin 2017-2021 ... 29*

*Rakstrarkarmar fyri § 3 Fíggjarmál 2017-2021 ... 30*

*Rakstrarkarmar fyri § 5 Fiskivinnumál 2017-2021 ... 32*

*Rakstrarkarmar fyri § 7 Mentamál 2017-2021 ... 34*

*Rakstrarkarmar fyri § 11 Heilsu- og innlendismál 2017-2021 ... 36*

*Rakstrarkarmar fyri § 12 Almannamál 2017-2021 ... 38*

*Rakstrarkarmar fyri § 13 Uttanríkis- og vinnumál 2017-2021 ... 40*

*Rakstrarkarmar fyri § 17 Samferðslumál 2017-2021 ... 41*

*Inntøkukarmar fyri § 20 Inntøkur 2017-2021 ... 43*

*Løguætlan 2017-2021 ... 44*

**Fylgiskjal A: Dagførd uppgerð av konjunkturjavnaðum úrsliti fyri almenna geiran ... 46**

Kvíggjartún 1 • Box 2039 • FO-165 Argir
☏ (+298) 35 20 20 • 🖷 (+298) 35 20 25 • ✉ fmr@fmr.fo • www.fmr.fo

**Løgtingið** **Argir**, 16. mars 2015

Løgtingsmál nr. 106/2015: Uppskot til samtyktar um játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2017

**Uppskot**

**til**

**samtyktar um játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2017**

Við hesi løgtingssamtykt tekur Løgtingið undir við, at samlaði útreiðslukarmurin á løgtingsfíggjarlógini fyri 2017 verður 4.742,2 mió. kr. Rakstrarkarmurin verður 4.462,2 mió. kr., og løgukarmurin verður 280,0 mió. kr. Samlaði inntøkukarmurin verður 4.792,2 mió. kr. Úrslitið (RLÚ1) á løgtingsfíggjarlógini fyri 2017 verður 330 mió. kr. uttan løgur. Íroknað løgur verður úrslitið 50 mió. kr.

Í talvuni niðanfyri eru samlaðu játtanarkarmarnir fyri 2017 býttir á greinar.

**Játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2017**

| *Mió. kr.* | **Rakstur** | **Løgur** |
|---|---|---|
| § 1 Løgtingið | 53,4 | 0,0 |
| § 2 Løgmansfyrisitingin | 37,0 | 2,0 |
| § 3 Fíggjarmál | 304,2 | 20,0 |
| § 5 Fiskivinnumál | 163,2 | 10,0 |
| § 7 Mentamál | 1.055,4 | 97,3 |
| § 11 Heilsu- og innlendismál | 1.063,1 | 92,0 |
| § 12 Almannamál | 1.448,5 | 15,0 |
| § 13 Uttanríkis- og vinnumál | 102,2 | 0,0 |
| § 17 Samferðslumál | 235,4 | 43,7 |
| ***Útreiðslur tilsamans*** | **4.462,2** | **280,0** |
| **Útreiðslukarmur** | **4.742,2** | |
| **Inntøkukarmur § 20** | **4.792,2** | |
| **RLÚ-úrslit** | **50,0** | |

Til tess at røkka ætlaða úrslitinum á løgtingsfíggjarlógini fyri 2017 er grundarlagið tær givnu fortreytirnar fyri framskrivingum, raðfestingum og tillagingum á útreiðslu- og inntøkusíðu landskassans soleiðis, sum tað er lýst í viðmerkingunum og hjáløgdu Búskaparfrágreiðing I.

**Viðmerkingar**

14. september 2015 undirskrivaðu Javnaðarflokkurin, Tjóðveldi og Framsókn samgonguskjal og skipaðu nýggja samgongu. Í samgonguskjalinum og fylgiskjali til hetta verður millum annað staðfest:

*"Vit skulu skapa einar sterkar, samhaldsfastar og sjálvbjargnar Føroyar. Vit vilja menna eitt tíðarhóskandi vælferðarsamfelag fyri alt fólkið í Føroyum, sum kann kappast við grannalondini um at draga fólk og virksemi til sín.*
*… Skilvísur búskaparpolitikkur skal leggja trygga grund undir ein sjálvbjargnan og haldføran búskap. Javnari býti av ríkidøminum skal tryggja, at virðini í størri mun koma í umfar og harvið skapa størri vøkstur og trivnað. Nýskipanir skulu menna einar vælvirkandi Føroyar við fleiri møguleikum, framburði og dyggari áliti og javnrættindum fyri allar borgarar.*
*…Eitt av høvuðsmálunum hjá samgonguni er at tryggja haldførið í búskapinum og at vísa fíggjarliga ábyrgd.*
*…Búskaparpolitikkurin skal javna sveiggini í búskapinum og stimbra ein sjálvbjargnan og langtíðarhaldføran búskap."*

Játtanarkarmarnir leggja yvirskipaðu fíggjarpolitisku karmarnar fyri politikki samgongunnar. Innan hesar játtanarkarmarnar, ið fevna um umleið 5 mia. kr. á útreiðslusíðuni og tað sama á inntøkusíðuni, verður politikkur samgongunnar framdur.

**Búskaparstøðan og avbjóðingar**

Búskaparstøðan í landinum er sum heild góð í løtuni, hóast avbjóðingar eru í pørtum av búskapinum.

Størstu avbjóðingarnar í búskapinum eru helst at betra haldførið í almenna búskapinum og at tryggja, at fólkafráflyting ikki tekur seg upp aftur.

Almenni geirin tilsamans hevur havt hall øll árini 2008 til og við 2015. Hallið hjá landinum í 2015 verður sannlíkt 75-100 mió. kr. ella um ½ % av BTÚ. Í 2016 kann roknast við, at úrslitið hjá landinum verður eitt lítið avlop.

**Bygnaðarliga hallið**

Fíggjarmálaráðið metir, at bygnaðarliga hallið í samlaða almenna geiranum verður umleið 150 mió. kr. í 2015. Væntaða bygnaðarliga úrslitið fyri 2016 verður áleið tað sama sum í 2015, vegna væntað verri úrslit hjá kommununum sambært fíggjarætlanum teirra.

At bygnaðarliga hallið hjá tí samlaða almenna geiranum helst verður umleið 150 mió. kr. í 2015 merkir, at neyðugt verður við varandi fíggjarpolitiskum tiltøkum á umleið 40-50 mió. kr. árliga til 2018-19, skal bygnaðarliga hallið hjá tí almenna fáast burtur.

Uppgerðirnar av bygnaðarliga hallinum benda á, at bygnaðarliga hallið síðstu árini fyri tað mesta er komið av hallinum hjá landinum. Tí vera fíggjarpolitisk tiltøk neyðug, sum ávirka inntøkur og útreiðslur hjá landinum. Verður hetta ikki gjørt, fer hetta at ávirka kredittvirðið og møguleikarnar hjá føroyskum myndugleikum at reka sjálvstøðugan fíggjarpolitikk í framtíðini.

**Ábyrgdarfullur og varin fíggjarpolitikkur**

Búskaparligu góðu tíðirnar, saman við avbjóðingunum at tryggja fíggjarliga haldførið hjá landinum, krevja skilvísan og varligan fíggjarpolitikk.

Broytingarnar í fólkasamansetingini, har vit gerast lutfalsliga fleiri eldri, leggja í hesum og næstu árini alsamt størri trýst á tænasturnar innan heilsumál og almannamál. Fyri at tryggja framtíðar vælferðarsamfelagið mugu átøk fremjast bæði á inntøku- og útreiðslusíðu landsins næstu árini. Við hesum verða lunnar lagdir undir ein sjálvbjargnan føroyskan búskap.

Fráboðaðu nýskipanirnar, eitt nú innan pensjóns-, fiskivinnu- og heilsuøkið umframt virðisøking av tilfeingi landsins og vinnumenning sum heild, eru týðandi fortreytir fyri hesum átøkum.

**Rakstrarúrslit og løgukarmur**

Í játtanarkørmunum fyri 2017 er rakstrarúrslitið 330 mió. kr. Løgukarmurin verður 280 mió. kr. Samlaða úrslitið (RLÚ 1) verður 50 mió. kr. í 2017.

Rakstrarútreiðslurnar hækka 1,8 % íroknað lønarframskrivingar. Landsstýrið sýnir við hesum fíggjarpolitiskt varsemi. Nevnt kann verða, at Búskaparráðið metir, at búskaparvøksturin verður 2,9 % í 2017.

Løgukarmurin hækkar úr 220 mió. kr. í 2016 til 280 mió. kr. í 2017. Serliga liðugtgerð av miðnámsskúlanum Glasir og útbyggingin av Landssjúkrahúsinum krevja stórar játtanir í 2017.

Størstu løgurnar hjá landinum í tíðarskeiðnum fyri játtanarkarmarnar (2017-2021) eru Eysturoyar- og Sandoyartunlarnir, Glasir, Landssjúkrahúsið, Hvalbiartunnil, Tjóðleikhús, Havrannsóknarskip, Talgildu Føroyar og bústaðir til lesandi og fólk við serligum avbjóðingum.

Samgongan hevur sett sær fyri at fremja hesar løgur, og tí verður løgukarmurin hækkaður til 330 mió. kr. í 2018, 370 mió. kr. í 2019 og 350 mió. kr. árini 2020-2021.

Hóast ávísa hækking í samlaða løgukarminum, so er talan um løgur, ið eru sera ymiskar í vavi, ymiskar av slagi og ávirka búskapin ymiskt. Eitt nú er stórur munur á, hvussu løgur í undirsjóvartunlar, bygningar, KT-skipanir og skipabygging ávirka búskapin.

Við kommunalum løgum á umleið 600 mió. kr. í 2016, umframt stórum íløgum hjá privatum og feløgum, er neyðugt hjá landinum at halda aftur í ávísan mun við løguvirkseminum fyri at tálma yvirupphiting av búskapinum. Hetta samsvarar við tilráðingar Búskaparráðsins.

**Sjálvbjargnar, samhaldsfastar og tíðarhóskandi Føroyar**

Samgongan lovaði føroyingum einar meira sjálvbjargnar, samhaldsfastar og tíðarhóskandi Føroyar. Hetta verður nú framt í verki.

Fleiri átøk eru sett í verk ella verða sett í verk í ***2016***, millum hesi eru:

- **Størri sjálvbjargni** - Hall vent til avlop á fíggjarlóg, ríkisveitingin er fastfryst, nýggi Landsbanki Føroya verður stovnaður og Búskapargrunnur Føroya endurnýggjaður. Hartil verður framd heimtøka av útlendingamálum og størri játtan til menningar- og neyðhjálp.
- **Nýskipanir** - Uppskot til fiskivinnunýskipan, pensjónsnýskipan og menningarætlan fyri heilsuverkið verða gjørd, og stig verða sett í verk.
- **Virðisøking** – økt játtan til fiskivinnuroyndir, vinnugransking, marknaðarføring av Føroyum sum maritimur tænastudepil og til talgilding av Føroyum umframt stuðulsjáttan sett av til at gera Føroyar grønari. Hartil léttari at stovna íverksetarafeløg.
- **Munandi skattalætti til lág- og miðallønt** – heilar 137 mió. kr. latnar í lætta til lág- og miðallønt.

- **Hægri pensjón til tey, ið hava lága pensjón** - samhaldsfasti arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin styrktur og pensjónsviðbótin hækkað.
- **Barnafamiljur betri kor** - Barsilsskipanin betrað við, at tíðarskeiðið varð longt 6 vikur, og munandi ískoyti til barnafamiljur í trongum fíggjarligum korum sett í verk.
- **Útbúgving og mentan uppraðfest –** nýggj búskaparfrøðiútbúgving á Fróðskaparsetrinum, fleiri inn til sjúkrarøktarfrøðiútbúgvingina, miðnámsútbúgvingar til ung við serligum avbjóðingum raðfestar og játtan til mentanargrunnin v.m. uppraðfest.
- **Arbeiðseftirlitið styrkt** og sálarfrøðiliga arbeiðsumhvørvið raðfest.
- **Økismenning** - Fleiri túrar á Suðuroyarleiðini og Sandoyarleiðini, havnarlagið í Svínoy og á Krambatanga útbygt, Viðareiðistunnilin liðugtgjørdur, Virknis- og umlættingardepil á Sandi gerast liðugur, Ítróttaháskúli byrjaður í Vági og gongd á Eysturoyar- og Sandoyartunlar.

Í ***2017*** verða enn fleiri átøk framd fyri at røkka málunum og fyri at betra fíggjarliga haldførið og sjálvbjargnið hjá føroyska samfelagnum. Hetta verður millum annað gjørt við at fremja átøk, ið stuðla undir meira varandi fólkavøkstur, eitt tíðarhóskandi vælferðarsamfelag og størri virðisøking og vinnumenning. Millum átøkini eru fylgjandi:

**Virðisøking og vinnumenning**

- **Íløgur í virðisøking** við munandi hægri játtan til fiskivinnuroyndir/gransking.
- **Fiskivinnunýskipan** setast í verk.
- **Íløgur í KT**, virðisøking og kappingarførið við munandi hægri játtan til talgilding av Føroyum.
- Átøk fremjast at fáa **betri marknaðaratgongd** og atgongd til nýggjar marknaðir.
- Skipa depil, ið marknaðarførir Føroyar sum **maritimur tænastudepil**.
- Framhaldandi **marknaðarføring av Føroyu**m sum ferðaland og átøk fremjast at samskipa ferðavinnuna betur.
- **Kreativar vinnur** stimbraðar við stovnsetan av Filmshúsi.
- **FarGen** raðfest við størri játtan til framhaldandi menning.
- Átøk fremjast at menna **føroyska matmentan** og føroyskar førleikar.

**Fólkavøkstur**

- **Fíggjarligan lætta til barnafamiljur** – barnafrádrátturin verður hækkaður fyri smábarnafamiljur.
- **Lættari at vera lesandi** – lestrarstuðulin verður hækkaður, nýggjar útbúgvingar settar í verk og íløgur fremjast í Fróðskaparsetrið og lestrarbý.
- **Mentanarøkið styrkjast** – mentan og list størri játtan, fremja virknan málpolitikk, savnsøkið raðfest og størri íløgu í filmslist (Filmshús).

- **Virðilig kor til fólk við serligum avbjóðingum** – munandi íløgur í nýggjar bústovnar, vardir bústaðir (saman við Bústøðum) og fyritíðarpensjónsøkið endurskoðast og styrkjast.

**Tíðarhóskandi**

- **Trygt heilsuverk** – menningarætlan fyri heilsuverkið fremjast, økt skurðlinjuvirksemi, átøk at fáa fleiri serlæknar við at seta av pening serstakt til fleiri serlæknar í 2017, tænastan hjá Gigni til børn millum 2 og 7 ár betrað v.m.
- **Grønari Føroyar** – náttúru- og umhvørvisverndarátøk fremjast, byggilóg dagførast, umleggja vegskatt frá vektgjaldi til gjald á útlát, møguleiki fyri bíligari "grønari" el-orku og møguleiki at fáa afturborið MVG fyri keyp av el-bilum.
- **Økismenning** – søguliga stóra samferðsluíløgan í Eysturoyar- og Sandoyartunlar í gongd, fleiri vardir bústaðir bygdir kring landið (saman við Bústøðum), Virknis- og umlættingardepilin á Sandi og SALT mentanarhúsið á Drelnesi tikin fult í nýtslu.
- **Virkin arbeiðsmarknaðarpolitikkur** – uppskot til felags lønartalvu, menna arbeiðsmarknaðardepil (eftirútbúgving, førleikameting v.m.), varskógvaraskipan fyri almenn starvsfólk setast í verk og stig tikin at betra sálarliga arbeiðsumhvørvið.
- **Pensjónsnýskipan setast í verk.**
- **Fólkaatkvøða um nýggja stjórnarskipan.**

**Fortreytir fyri framrokning av útreiðslum**

Høvuðsfortreytin fyri uppskotinum til játtanarkarmar 2017-2021 er at føra ein skilvísan fíggjarpolitikk, sum skal leggja lunnar undir ein sjálvbargnan og haldføran búskap føroyingum at frama.

Framskrivingar av lógarbundnum játtanum og bundnum raðfestingum eru gjørdar fyri árini 2017 til 2021.

Framrokningarnar eru í høvuðsheitum grundaðar á fólkatal og fólkasamanseting, til dømis metta talinum á skúlanæmingum og fólkapensjónistum 2017-2021. Í framrokningunum er lagt upp fyri bundnum raðfestingum næstu árini, til dømis at nýggir stovnar verða tiknir í nýtslu. Í játtanarkørmunum er framskrivað í ársins prísum í 2017, men árini 2018-2021 verður framskrivað í føstum prísum. Lønarútreiðslurnar eru framskrivaðar samsvarandi tí støði, sum er lagt við samráðingum í 2015 og 2016. Sáttmálarnir fara úr gildi 1. oktober 2017, og er hetta eisini lagt inn í karmarnar við lønarframskriving á 1,43 %, samsvarandi 1,9 % í 9 mánaðir í 2017.

Játtanarkarmarnir eru gjørdir við verandi rentustøði. Hetta er ein óvissa í játtanarkørmunum, tí rentustøðið kann broytast, og harvið kunnu útreiðslur landskassans til rentustuðul og rentuútreiðslur av skuldini eisini broytast.

Løgukarmurin verður 280 mió. kr. í 2017. Løgukarmurin verður 330 mió. kr. í 2018, 370 mió. kr. í 2019, og 350 mió. kr. árini 2020-2021. Í løgukarminum er íroknað 35 mió. kr. í partapeningi til felagið Eystur- og Sandoyartunlar og 20 mió. kr. til verkætlanina Talgildu Føroyar, hóast hesar sambært játtanarskipanini eru ávikavist stuðulsjáttan og rakstrarjáttan.

**Fortreytir fyri framrokning av inntøkum**

Inntøkurnar í uppskotinum til játtanarkarmar fyri árini 2017-2021 eru framroknaðar við støði í søguligum inntøkutølum og teimum fortreytum, sum eru kendar í løtuni. Í játtanarkørmunum eru

inntøkurnar framskrivaðar í ársins prísum í 2017, men árini 2018-2021 verður framskrivað í føstum prísum.

Framskrivingarnar eru gjørdar sambært metingum um útlit fyri gongdini í búskapinum. Forsagnir frá millumtjóða stovnum og Búskaparráðnum eru brúktar sum partur av grundarlagnum undir metingunum.

Sum vant, verða inntøkurnar framroknaðar varisliga. Royndirnar síðstu árini eru, at tað er torført at meta um inntøkurnar hjá landskassanum og um tær broytingar, sum kunnu koma fyri av ymiskum tiltøkum, skatta- og avgjaldsbroytingum og øðrum viðurskiftum.

Í fortreytunum fyri inntøkunum verður BTÚ í ársins prísum mett at vaksa um 3 % í 2017. Á teimum skatta- og inntøkujáttanum, har hetta verður hildið vera neyðugt, eru gjørdar serstakar metingar út frá fortreytunum fyri játtanini.

### Uppskot til játtanarkarmar 2017-2021

Uppskotið til játtanarkarmar byggir á fíggjarlógina fyri 2016, umframt politiskar semjur og avtalur gjørdar síðani.

Í talvuni niðanfyri er uppskotið til játtanarkarmar fyri árini 2017 til 2021 útgreinað og býtt á greinar og ár.

**Talva: Útgreinaðir játtanarkarmar fyri 2017-2021**

| *Mió. kr.* | **2016** | **2017** | **2018** | **2019** | **2020** | **2021** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Rakstrarútreiðslur, §1-§17: | | | | | | |
| § 1 Løgtingið | 53,1 | 53,4 | 53,6 | 55,8 | 55,0 | 54,2 |
| § 2 Løgmansfyrisitingin | 37,9 | 37,0 | 36,8 | 36,6 | 36,5 | 36,3 |
| § 3 Fíggjarmál | 293,3 | 304,2 | 310,9 | 317,5 | 324,0 | 330,5 |
| § 5 Fiskivinnumál | 160,2 | 163,2 | 158,4 | 157,6 | 156,9 | 156,2 |
| § 7 Mentamál | 1.027,2 | 1.055,4 | 1.053,9 | 1.055,1 | 1.055,8 | 1.056,5 |
| § 11 Heilsu- og innlendismál | 1.038,0 | 1.063,1 | 1.068,5 | 1.072,8 | 1.073,3 | 1.074,8 |
| § 12 Almannamál | 1.440,0 | 1.448,5 | 1.456,6 | 1.462,9 | 1.471,4 | 1.479,5 |
| § 13 Uttanríkis- og vinnumál | 98,8 | 102,2 | 101,9 | 101,6 | 101,3 | 101,0 |
| § 17 Samferðslumál | 234,3 | 235,4 | 234,2 | 233,1 | 231,9 | 230,8 |
| **Rakstrarútreiðslur tilsamans** | **4.382,7** | **4.462,2** | **4.474,9** | **4.493,0** | **4.506,1** | **4.519,7** |
| **Løguútreiðslur, §1-§17*** | **220,5** | **280,0** | **330,0** | **370,0** | **350,0** | **350,0** |
| **Rentuútreiðslur, netto** | **16,0** | **2,6** | **9,7** | **17,0** | **21,0** | **25,0** |
| **Inntøkur** | **4.628,2** | **4.794,8** | **4.923,6** | **4.994,7** | **5.066,2** | **5.134,0** |
| **RLÚ-úrslit** | **9,1** | **50,0** | **109,1** | **114,7** | **189,0** | **239,3** |

Gev gætur, at 2016 er tikið við sum byrjunarár við fíggjarlógartølum, og 2016 og 2017 eru í ársins prísum, meðan 2018 til 2021 eru í føstum prísum.

* Løgurnar eru íroknað játtanir til P/F Eystur- og Sandoyartunlar og til verkætlanina Talgildu Føroyar.

**Skjal hjálagt:**

Skjal 1: Búskaparfrágreiðing I, mars 2016

Fíggjarmálaráðið, 16. mars 2016

Kristina Háfoss
landsstýriskvinna í fíggjarmálum

/ Bjarni Askham Bjarnason

## Inngangur

Sambært § 8 í løgtingslóg nr. 42 frá 4. mai 2009 um landsins játtanarskipan skal frágreiðing (Búskaparfrágreiðing I), sum lýsir og metir um búskaparstøðu Føroya, harímillum tann almenna geiran, verða løgd við uppskotinum til løgtingssamtykt um játtanarkarmar. Uppskotið til løgtingssamtykt um játtanarkarmar fyri fíggjarlógina næsta ár skal leggjast fram fyri 1. apríl.

Nýggj samgonga varð sum kunnugt skipað í september 2015. Uppskotið til játtanarkarmar er gjørt við støði í fíggjarpolitisku málunum og samgonguskjalinum hjá nýggju samgonguni. Uppskotið til løgtingssamtykt um játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2017 er í høvuðsheitum grundað á samtyktu løgtingsfíggjarlógina fyri 2016 (løgtingsmál nr. 5/2015) umframt á nýggjar raðfestingar hjá samgonguni. Nýggjar framrokningar eru gjørdar av inntøkum og útreiðslum, umframt at ávís tiltøk verða sett í verk fyri at betra haldførið í almenna búskapinum.

Frágreiðingin er sett soleiðis saman, at fyrst er stutt lýsing av gongdini í føroyska búskapinum, av gongdini í altjóða búskapinum og av almenna búskapinum. Síðani verður greitt frá uppskotinum til játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2017. Fortreytirnar fyri játtanarkørmunum verða eisini lýstar, umframt at framskrivingar fyri árini 2017 til 2021 verða lýstar. Løguætlanin hjá landsstýrinum fyri árini 2017-2021 verður eisini lýst.

## Lýsing av gongdini í búskapinum

Síðstu 2-3 árini hevur stórur vøkstur verið í føroyska búskapinum, og vøksturin tók dik á seg síðsta ársfjórðing í fjør. Hetta sæst á samlaðu lønargjaldingunum í landinum, sum byrjaðu at vaksa av álvara miðskeiðis í 2013, og vøksturin tók síðani dik á seg síðsta ársfjórðing í fjør. Arbeiðsloysið er harafturat lækkað støðugt úr umleið 2.000 við ársbyrjan 2011 til umleið 650 í november 2015, sum svarar til 2,4%. Síðstu tveir ársfjórðingarnar í fjør lækkaði arbeiðsloysið úr umleið 850 fólk til 650 fólk. Eisini løntakararnir eru vorðnir munandi fleiri síðstu 2-3 árini, og talið á løntakarum hækkar umleið 3% árliga.

Mynd 1
Bruttotjóðarúrtøka í ársins prísum og árlig broyting í %, 1998-2017




* Tølini fyri 2014 til 2017 eru metingar og skulu lesast við fyrivarni.
Kelda: Hagstovan og forsagnir frá Búskaparráðnum.

Framgongdin í búskapinum í 2014 og 2015 kemur serliga av vaksandi útflutningi og av almennum og privatum íløgum. Vøksturin í útflutningi kemur bæði av størri nøgdum og av góðari prísgongd sum heild innan alivinnuna og uppsjóvarvinnuna. Marknaðarprísir á aldum laksi hækkaðu serstakliga í 2013, sum ávirkaði føroyska tjóðarroknskapin tað árið, og prísirnar á aldum laksi hava sum heild verið á sama stigi ella eru hækkaðir nakað í 2014 og 2015.

Harafturat er munandi ískoyti til vøksturin komið av privatum og almennum íløgum síðstu 2-3 árini. Roknast kann eisini við nógvum almennum og privatum íløgum í ár og næsta ár, og ískoytið til vøksturin frá íløgum verður helst at kalla óbroytt í ár og í 2017.

Mynd 1 omanfyri vísir gongdina í bruttotjóðarúrtøku árini 1998-2013 og metingar fyri árini 2014-2017. Samanumtikið metir Fíggjarmálaráðið, at føroyski búskapurin, BTÚ, vaks umleið 6% í 2015, og at vøksturin í 2016 og 2017 verður ávikavist 5% og 3% (tølini eru øll í ársins prísum).

Í 2016 og 2017 eru ikki útlit til, at útlendski eftirspurningurin í sama mun stimbrar búskapin eins og árini frammanundan. Tí kann roknast við, at búskaparvøksturin hæsar nakað av í 2016 og 2017 og at innlendis eftirspurningur verður ein størri drívmegi í búskapinum sammett við undanfarin ár.

Metingarnar hjá Fíggjarmálaráðnum samsvara við metingar hjá Búskaparráðnum fyri næstu árini. Metingarnar hjá Búskaparráðnum av vøkstrinum í 2016 og 2017 eru treytaðar av, at innlendis eftirspurningurin veksur nakað samstundis sum at vøksturin í útlendskum eftirspurningurin ikki veksur í sama mun. Hækkar innlendis eftirspurningurin frá húsarhaldum og vinnufyritøkum ikki samsvarandi metingunum, fer hetta sjálvsagt at ávirka metingarnar av vøkstrinum í 2016 og 2017.

Fleiri óvissur eru, sum kunnu ávirka gongdina í 2016 og 2017, og sum kunnu hava við sær, at vøksturin verður lægri enn væntað. Millum annað kann nevnast, at heimsbúskapurin sum heild er

viknaður síðsta hálva árið. Serliga í Evropa, Russlandi og Kina eru búskapirnir viknaðir, og stór óvissa er um gongdina í heimsbúskapinum næstu árini. Í Stóra Bretlandi verður fólkaatkvøða um limaskapin í ES í summar, sum kann hava órógv á fíggjarmarknaðum og politiska kreppu í Evropa við sær.

At enda er eisini nakað av óvissu um føroysku kvoturnar av uppsjóvarfiski næstu 2-3 árini og um avtalurnar millum strandarlondini um býtið av kvotum, sum londini ikki eru samd um. Sum er, hava Føroyar bara avtalu um makrelfiskiskapin við hini strandarlondini. Meira hevur eisini verið fiskað av serliga makreli og svartkjafti sammett við lívfrøðiligar tilráðingar síðstu árini, og hetta hevur eisini óvissu við sær um, hvussu leingi verandi fiskiskapur fer at halda fram. Samanumtikið eru útlit til, at útflutningsvirðið á uppsjóvarfiski verður at kalla óbroytt ella hækkar nakað í 2016 sammett við í 2015.

**Mynd 2**

**Lønargjaldingar í mió. kr., býtt á ársfjórðingar, 1. ársfjórðingur 1985 til 4. ársfjórðing 2015**




Kelda: Hagstovan.

## Framgongdin tók dik á seg seinnu helvt av 2015

Hagtøl yvir lønargjaldingar, løntakarar og arbeiðsloysi benda á, at vøksturin í føroyska búskapinum tók dik á seg miðskeiðis í fjør og helt fram móti ársskiftinum 2015/16. Á mynd 2 omanfyri sæst gongdin í lønargjaldingum frá 1985 til 2015 býtt á ársfjórðingar. Hagtøl vísa eisini, at nettotilflytingin av fólki vaks í 2015 og at hetta í stóran mun stavar frá, at fráflytingin av landinum er minkað. Hetta kemur helst av, at færri fólk fara av landinum at útbúgva seg sammett við áður og av at fleiri áhugaverd arbeiðspláss hava tikið seg upp í Føroyum. Síðani 2011 er tilflytingin vaksin nakað, tó ikki í sama mun, sum fráflytingin er minkað.

Tekin eru eisini um, at eftirspurningurin frá húsarhaldum og fyritøkum vaks líðandi í 2015 og at eftirspurningurin framvegis er vaksandi. Hetta sæst millum annað í innflutningi av vørum til beinleiðis húsarhaldsnýtslu og í inntøkunum hjá landinum frá meirvirðisgjaldinum og øðrum umsetningsgjøldum. Harafturat benda umsetningshagtølini frá Hagstovuni á, at húsarhaldsnýtslan framhaldandi veksur spakuliga.

Í konjunkturkanningini, sum Hagstovan gjørdi í januar í ár, søgdu flestu fyritøkur í handilsvinnuni frá væl betri sølu síðsta árið sammett við í undanfarnum kanningum. Hetta bendir eisini á, at eftirspurningurin frá húsarhaldum er vaksin síðsta árið. Samstundis vísti kanningin, at færri fyritøkur í handilsvinnuni rokna við størri sølu næsta árið sammett við undanfarnar kanningar. Tó er framvegis ein meiriluti av fyritøkunum í handilsvinnuni, sum rokna við, at sølan fer at vaksa næsta árið.

Mynd 3

Føroyska feskfiskaveiðan eftir botnfiski í nøgd*, býtt á ársfjórðingar, tús. tons, 1993Q1 til 2015Q4




* Tølini vísa veiðuna, sum verður skrásett um avreiðingarskipanina og í landaðari vekt. Í avreiðingunum er allur fiskiskapur hjá føroyskum skipum og bátum á føroyskum sjóøki, føroyska feskfiskaveiðan í íslendskum og fiskiskapurin á Flemish Cap. Uppsjóvarfiskur er ikki við í uppgerðini.
Kelda: Hagstovan.

Sum heild er gongdin framvegis vánalig í heimligu fiskivinnuni, tó at nøkur línuskip, trolbátar og trolarar, sum royna undir Føroyum, hava góðan og lønandi rakstur. Verður hugt eftir veiðini av feskfiski, ið er farin um avreiðingarskipanina, hava nøgd og virði verið støðugt minkandi síðstu umleið 15 árini.

Nøgdirnar eru ikki hækkaðar, hóast feskfiskaveiðan í íslendskum sjóøki og fiskiskapurin á Flemish Cap verða íroknað í hagtølunum. Hetta sæst í mynd 3, sum vísir avreiðingar tilsamans av vanligum botnfiski um avreiðingarskipanina býtt á ársfjórðingar. Á myndini sæst, at minni varð avreitt av botnfiski tilsamans í nøgd í 2015 sammett við kreppuárini miðskeiðis í 1990'unum.

Roknast kann við, at ískoytið til búskaparvøksturin frá hesi vinnuni og atknýttu fiskavirkisvinnuni á landi verður avmarkað næstu árini. Møguleiki er tó fyri vøkstri í hesum vinnum, sum frálíður, um botnfiskastovnarnir koma fyri seg aftur, fiskiskapurin batnar og verður meira burðardyggur í framtíðini. Roknast kann kortini við ískoyti til vøksturin frá nýggju fiskavirkjunum, sum virka uppsjóvarfisk á landi, og frá ætlaðu íløgunum og útbyggingunum av hesum virkjum. Hetta er eisini galdandi viðvíkjandi íløgunum, sum verða gjørdar av alivinnuni í framleiðsluorkuna á landi.

Síðstu árini hevur alivinnan givið stórt ískoyti til vøksturin í BTÚ. Serliga í 2013 hækkaðu prísirnir nógv, meðan nøgdirnar eru hækkaðar nógv síðani 2011. Tøkan og útflutningurin av aldum laksi í 2015 var nakað minni sammett við 2014, men framvegis er útflutningurin stórur sammett við undanfarin ár. Nøgdirnar vóru nakað minni í 2015 sammett við 2014, meðan miðalprísir á aldum laksi vóru nakað hægri.

Týdningurin av vøkstrinum í útflutningi av aldum laksi og størri nøgdum av uppsjóvarfiski síðstu árini sæst í myndunum 4 og 5 niðanfyri. Búskaparráðið metti til dømis í frágreiðingini frá mars í ár, at avreiðingarvirðið á sild, makreli og svartkjafti tilsamans hækkaði úr umleið 430 mió. kr. í 2009 til umleið 1,4 mia. kr. í 2015. Útflutningurin av aldum laksi er sama tíðarskeið hækkaður úr 1,2 mia. kr. til 2,8 mia. kr. Hesar báðar broytingar í nøgd og virði eru millum høvuðsorsøkirnar til, at bruttotjóðarúrtøkan er mett at vaksa úr umleið 12 mia. kr. í 2009 til umleið 16,5 mia. kr. í 2015. Vøksturin í føroysku bruttotjóðarúrtøkuni síðstu umleið tíggju árini hevur havt við sær, at munurin í bruttotjóðarúrtøku fyri hvønn íbúgva í Føroyum og í Danmark er minkaður munandi hesi árini.

Fyri tíggju árum síðani var bruttotjóðarúrtøkan fyri hvønn íbúgva í Danmark 15-20% størri sammett við í Føroyum. Mettu tølini fyri 2015 benda á, at bruttotjóðarúrtøkan fyri hvønn íbúgva í Danmark nú helst er umleið 5% størri sammett við í Føroyum.

**Mynd 4**

**Útflutningsvirðið á uppsjóvarfiski og aldum laksi, mió. kr., 1993 til 2015**




Viðm.: Talvan vísir virðið á útflutninginum úr Føroyum. Talvan vísir sostatt ikki avreiðingarvirðið hjá føroyskum skipum. Orsøkin til at nøgdirnar av svartkjafti ikki eru størri í myndini er helst, at stórur partur av svartkjaftinum endar sum fóður í laksaframleiðslu í Føroyum og síggjast tí ikki sum beinleiðis útflutningur.
Kelda: Hagstovan.

Næstu 1-2 árini kann roknast við, at prísir á aldum laksi sum heild verða støðugir ella at teir hækka nakað. Hetta kemur bæði av støðugt vaksandi eftirspurningi og av at útboðið væntandi ikki veksur í sama mun sum eftirspurningurin. Millum annað hava stórir trupulleikar verið í fleiri alibrúkum í Kili, sum helst fara at hava við sær, at útflutningurin av aldum laksi úr Kili verður munandi darvaður í 2016 og møguliga eisini í 2017. Næstu árini kann roknast við, at ískoyti til vøkstur frá alivinnuni verður støðugt, men at ískoytið til vøkstur neyvan verður eins stórt og árini 2013 og 2014.

**Mynd 5**

**Heildarveiða hjá føroyskum skipum býtt á fiskaslag í tús. tons, 2001 til 2014**




Viðm.: Tølini fyri 2015 eru ikki tøk enn.
Kelda: Hagstovan.

*Gongdin á arbeiðsmarknaðinum*

Arbeiðsmarknaðurin í Føroyum er sum heild væl fyri, og arbeiðsloysið er tað lægsta av okkara grannalondum. Arbeiðsloysið er lækkað støðugt síðsta árið og var umleið 650 fólk í november 2015, sum svarar til 2,4% av arbeiðsfjøldini. Arbeiðsloysið er annars lækkað úr umleið 2.000 fólk, tá ið arbeiðsloysið var hægst við ársbyrjan 2011, sum svaraði til 7,5% av arbeiðsfjøldini, sí mynd 6. Tá ið arbeiðsloysið er so lágt eins og nú, kann ikki roknast við, at arbeiðsloysið heldur áfram at lækka í sama mun.

Mynd 6

Árstíðarjavnaðir løntakarar (hava A-inntøku) í tali og árstíðarjavnað arbeiðsloysi í %, jan-1985 til des-2015




Kelda: Hagstovan.

Gongdin í lønargjaldingum býtt á vinnugreinar sæst í talvu 1. Samanumtikið vuksu lønargjaldingarnar omanfyri 6% í 2015. Árligi voksturin í lønargjaldingum er omanfyri 7%, ið er størsti árligi vøkstur í lønargjaldingum síðani tíðliga í 2008. Serliga lønargjaldingar innan fiski- og alivinnu og bygging hækkaðu í 2015, men eisini í privatum tænastuvinnum vuksu lønirnar útvið 5% í 2015.

**Talva 1. Lønargjaldingar í høvuðsvinnugreinum, 2012-2015, mió. kr.**

| *Vinnugrein* | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | Munur 2014-15 | Munur í % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fiski-, ali- o.o. ráevnisvinna | 1.363 | 1.362 | 1.488 | 1.672 | 184 | 12,4 |
| Byggivinna o.o. tilvirking | 841 | 842 | 947 | 1.027 | 80 | 8,5 |
| Privatar tænastuvinnur | 2.325 | 2.358 | 2.431 | 2.545 | 114 | 4,7 |
| Almenn o.o. tænasta | 2.561 | 2.620 | 2.683 | 2.779 | 96 | 3,6 |
| **Lønargjaldingar tilsamans** | **7.091** | **7.183** | **7.549** | **8.024** | **475** | **6,3** |

*Kelda: Hagstovan.*

Talið á løntakarum (talið á fólki, sum hava A-inntøku) er vaksið støðugt síðani 2011, tá ið tað vóru umleið 23.300 løntakarar, til umleið 25.000 í 2015. Talið á løntakarum var hægst í 2007, tá ið útvið 26.000 løntakarar vóru í Føroyum. Við verandi gongd fer talið á løntakarum í landinum í ár at hækka til sama støði, sum var í 2007, tá ið talið av løntakarum setti met. Mynd 6 vísir gongdina í arbeiðsloysinum og í talinum á løntakarum.

Løntakarar býttir á vinnugreinar síggjast eisini í talvu 2. Í talvu 2 sæst, at talið á løntakarum hækkar 3% árliga, sum er lutfalsliga stór hækking, verður borið saman við undanfarin ár. At løntakaratalið

hækkar er bæði tekin um, at arbeiðsloysið sum heild lækkar, at tilflyting er til landið og at fleiri viðkomandi størv taka seg upp í landinum. Løntakaratalið hækkar mest innan bygging og aðra tilvirking og innan privatar tænastuvinnur. Hetta er millum annað avleiðing av og tekin um, at nógv virksemi sum heild er í byggivinnuni.

**Talva 2. Løntakarar í desember eftir høvuðsvinnubólkum, 2012-2015, fólk í tali**

| *Vinnubólkur* | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | Munur 2014-15 | Munur í % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fiski-, ali- o.o. ráevnisvinna | 3.882 | 3.737 | 4.068 | 4.153 | 85 | 2,1 |
| Byggivinna o.o. tilvirking | 2.939 | 3.062 | 3.263 | 3.438 | 175 | 5,4 |
| Privatar tænastuvinnur | 7.994 | 8.094 | 8.267 | 8.506 | 239 | 2,9 |
| Almenn o.o. tænasta | 8.942 | 8.817 | 8.842 | 9.083 | 241 | 2,7 |
| **Løntakarar tilsamans** | **23.757** | **23.710** | **24.440** | **25.180** | **740** | **3,0** |

*Kelda: Hagstovan.*

## *Húsarhaldsnýtsla og eftirspurningur*

Inntøkurnar hjá landinum av meirvirðisgjaldinum og vøruinnflutningurin benda á, at innlendis eftirspurningurin vaks nakað í 2015, og at vøksturin hevur tikið dik á seg um ársskiftið 2015/16. Hetta sæst millum annað á mynd 7, sum vísir innflutning av drúgvum og hálvdrúgvum vørum. Sambært seinastu konjunkturkanning eru føroysk húsarhald framvegis bjartskygd um framtíðina og rokna við betri fíggjarstøðu og óbroyttum arbeiðsloysi næsta hálva árið.

**Mynd 7**

**Innflutningur av ódrúgvum, drúgvum og hálvdrúgvum nýtsluvørum og útgoldnar lønir, jan-1998 til feb-2016**




Kelda: Hagstovan.

Nýggjasta uppgerðin av konjunkturvísitalinum hjá Hagstovuni vísir, at føroysk húsarhald framvegis eru bjartskygd um framtíðina, tó at vísitalið er lækkað nakað samanlagt, sí mynd 6. At samlaða vísitalið lækkar kemur í stóran mun av, at vísitalið lækkar fyri størsta vinnubólkin, tilfeingisvinnurnar. Vísitalið lækkar fyri tilfeingisvinnurnar av tí, at fyritøkurnar rokna við at framleiða minni næsta hálva árið. Kanningin varð gjørd í januar mánaði í ár, og samlaða vísitalið lækkaði úr 23 til 20.

Mynd 8

Samanvigað konjunkturvísital fyri húsarhald og vinnu tilsamans, jun-2006 til jan-2016




Kelda: Fíggjarmálaráðið.

*Gongdin í brúkaraprísum*

Brúkaraprístalið er lækkað síðani ársbyrjan 2013, sí mynd 9. Størstu orsøkirnar eru, at rentustøðið sum heild er lækkað og kappingin er vorðin harðari millum peningastovnar og lægri oljuprísir. Renturnar í peningastovnunum eru lækkaðar munandi síðstu 2-3 árini. Lækkingin kemur bæði av harðari kapping millum peningastovnarnir og av lægri rentustigi á fíggjarmarknaðum sum heild. Brúkaraprístalið bendir eisini á, at prísirnir á vanligum gerandisvørum, mati og drekka, hava verið at kalla støðugir síðstu umleið 3 árini. Størstu orsøkirnar til hetta eru helst, at eftirspurningurin í samfelagnum ikki er vaksin stórvegis og at kappingin er harðnað á hesum marknaði.

Mynd 9

Brúkaraprístalið, 2001 til 2016, býtt á ársfjórðingar, indeks 2001 = 100




Kelda: Hagstovan.

*Gongdin í fólkatalinum*

Fólkafráflyting byrjaði í 2009, men hetta broyttist í 2013, tá ið fráflytingin av álvara byrjaði at minka. Í 2014 var aftur nettotilflyting til landið. Hetta er tekin um, at føroyski arbeiðsmarknaðurin stendur seg væl og at fleiri áhugaverd størv hava tikið seg upp í Føroyum síðstu árini. Nettotilflyting er á omanfyri 350 fólk árliga, og hetta er fyrstu ferð síðani 2008, at nettotilflyting er til landið, sí myndirnar 10 og 11. Fráflytingin vaks nógv eftir fíggjarkreppuna í 2009, og serliga árini 2010 til 2012 var stór nettofráflyting.

**Mynd 10**

**Fólk flutt til og úr Føroyum, jan-2007 til feb-2016**




Kelda: Hagstovan.

At tilflyting er til landið er eitt gott tekin, og heldur henda gongdin fram, fer hetta at betra munandi um haldførið í búskapinum. Eisini fer tað at lætta um uppgávuna at fáa betri javnvág millum almennar inntøkur og útreiðslur næstu árini. Enn er kortini ov tíðliga at siga við óvissu, um nettotilflytingin kemur av truplum umstøðum á arbeiðsmarknaðunum í okkara grannalondum, ella um talan er um eitt varandi fyribrigdi. Í øllum førum er umráðandi, at fleiri tiltøk verða sett í verk næstu árini, sum fyribyrgja, at fráflyting aftur tekur seg upp av landinum.

**Mynd 11**

**Broytingar í fólkatalinum, 1970 til 2015**




Kelda: Hagstovan.

Umstøðurnar á føroyska arbeiðsmarknaðinum eru soleiðis háttaðar, og støðan hjá føroyska samfelagnum sum útjaðari í Evropa merkir óivað, at næstu árini kann roknast við, at fráflytingin av landinum fer at sveiggja nógv. Hóast nettotilflyting er til landið í løtuni, benda framrokningar á, at fólkasamansetingin fer at broytast, soleiðis at lutfalsliga færri fólk vera í arbeiðsførum aldri. Mynd 9 vísir broytingar í fólkatalinum síðani 1970 býtt á ár. Á mynd 12 sæst, at fólkatalið í Føroyum væntandi setir met í 2016 og at veruligur fólkavøkstur hevur tikið seg upp fyri fyrstu ferð í umleið 10 ár.

Mynd 12
Fólkatal í Føroyum, 1. januar, 1985 til 2016




Kelda: Hagstovan.

Í nøkur ár hevur gongdin í fólkatalinum verið, at fólkatalið er vaksið mest í miðøkinum, Eysturoynni og í Norðuroyggjum. Henda gongd sæst eisini í talvu 3, sum millum annað vísir, at fólkatalið hækkar á Streymoynni, Eysturoynni, Norðuroyggjum og í Vágunum, meðan fólkatalið lækkar í Suðuroy og á Sandoynni.

Sama gongd sæst í øðrum londum í Vesturheiminum, har ið fólk flyta frá smærri býum og bygdum móti størri býum. Roknast kann við, at gongdin við at fólk flytur til miðøkið úr útjaðaranum fer at halda fram næstu árini, verða ikki ítøkilig politisk ella onnur stig sett í verk fyri at tálma hesum. Alt bendir á, at tað, sum frálíður, verður enn torførari hjá útjaðaraøkjum at standa seg í kappingini móti miðøkjunum og stóru býunum.

**Talva 3. Fólkatalið býtt á øki í landinum, 1. feb. 2015 til 1. feb. 2016**

| *Øki í landinum* | Fólkatal 1. feb. 2015 | Burðaravlop | Nettoflyting | Fólkatal 1. feb. 2016 | Broyting í tali | Broyting í % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Norðuroyggjar | 5.852 | 28 | 57 | 5.937 | 85 | 1,5 |
| Eysturoy | 10.800 | 44 | 97 | 10.941 | 141 | 1,3 |
| Tórshavnar økið* | 18.467 | 135 | 181 | 18.783 | 316 | 1,7 |
| Streymoyggin annars | 4.530 | 31 | 41 | 4.602 | 72 | 1,6 |
| Vágoy | 3.066 | 5 | 39 | 3.110 | 44 | 1,4 |
| Sandoy | 1.273 | 3 | -6 | 1.270 | -3 | -0,2 |
| Suðuroy | 4.640 | -6 | -43 | 4.591 | -49 | -1,1 |
| **Alt landið** | **48.628** | **240** | **366** | **49.234** | **606** | **1,2** |

**Tórshavn, Hoyvík og Argir.*
*Kelda: Hagstovan.*

Munurin í fólkavøkstri í miðøkinum og øðrum økjum í landinum er tekin um, at búskaparvøksturin er størstur í miðøkinum og at arbeiðsmøguleikar sum heild eru betri í miðøkinum sammett við onnur øki. Munurin í fólkavøkstri, sum sæst í talvu 3 og sum hevur verið staðfestur í nøkur ár, er eisini tekin um, at búskaparvøksturin síðstu árini ikki er komin Suðuroynni og Sandoynni til góðar í sama mun sum øðrum økjum í landinum.

## Viðskifti við útlond, handils- og gjaldsjavni

Avlop hevur verið á føroyska handilsjavnanum síðani 2014, tá ið avlopið var umleið 400 mió. kr. Í 2015 var størri avlop á umleið 700 mió. kr. At oljuprísurin er lækkaður í stórum síðsta hálvtannað árið hevur sjálvsagt ávirkað handilsjavnan munandi í 2014 og 2015. Heldur verandi gongd fram við lágum oljuprísum, vaksandi útflutningi og varisligum vøkstri í privatu nýtsluni, verður eisini avlop á handilsjavnanum í 2016. Hetta sæst eisini í mynd 13, sum vísir føroyska handilsjavnan fyri árini 1988 til 2015.

**Mynd 13**

**Innflutningur og útflutningur, mió. kr., 1988 til 2015**




Viðm.: Handilsjavnin fevnir bara um vørur; tænastur eru sostatt ikki við.
Kelda: Hagstovan.

Handilsjavnin fevnir bara um vøruhandil við útlond; sostatt verða tænastuveitingar til og frá útlondum ikki taldar við í handilsjavnan. Tænastuveitingar eru hinvegin taldar við í *vøru- og tænastujavnan*. Uppgerðir hjá Hagstovuni av tænastujavnanum benda á, at Føroyar hava hall á tænastujavnanum við útlond á millum hálva og eina mia. kr. árliga. Óvissan er kortini stór í hesum uppgerðum, og óvist er, hvussu eftirfarandi uppgerðir eru av føroyska tænastujavnanum.

**Mynd 14**

**Rakstrarviðskifti gjaldsjavnans í mió. kr., 1998-2015**




* Tølini fyri 2013 til 2015 eru metingar og skulu lesast við fyrivarni.
Kelda: Hagstovan.

Handilsjavnin sveiggjar nógv frá ári til ár alt eftir privatari nýtslu, íløgum í vinnulívinum, oljuprísum og útflutningvirðinum á fiski og aldum laksi. Eins og víst í mynd 13 omanfyri, er

føroyski útflutningurin vaksin sera nógv síðstu árini úr 4,2 mia. kr. í 2009 til umleið 6 mia. kr. í 2015, ella ein vøkstur á omanfyri 40% eftir seks árum.

Uppgerðir av gjaldsjavnanum eru tøkar fram til 2012. Fyri árini eftir 2012 ber bara til at meta leysliga um gjaldsjavnan við støði í gongdini í handilsjavnanum. Hagtøl benda á, at stór avlop hava verið á føroyska gjaldsjavnanum síðani 2013 og at avlop aftur verður í 2016, serliga um verandi gongd við lágum oljuprísum heldur fram.

Handilsjavnin er størsti einstaki parturin av gjaldsjavnanum og tann parturin, sum broytist mest frá ári til ár. Tí ber til leysliga at meta um gjaldsjavnan fyri árini frá 2013 til 2015. Grundað á handilsjavnan, var helst avlop á gjaldsjavnanum á 500-700 mió. kr. í 2013, 1,0-1,2 mia. kr. í 2014 og nakað størri avlop var helst í 2015. Gjaldsjavnin fram til 2012 og metingar fyri 2013 til 2015 eru víst í mynd 14 omanfyri.

## Heimsbúskapurin

Størri óvissa er um gongdina í heimsbúskapinum nú sammett við fyri hálvum øðrum ári síðani. Stígur kom í framgongdina í fleiri týðandi londum miðskeiðis í 2015. Í flestu londum eru útlit til lítlan ella ongan veruligan vøkstur í 2016. Búskapurin í USA hevur í fleiri áratíggju verið millum stóru drívmegirnar í heimsbúskapinum, og í USA eru útlit til vøkstur á umleið 2% í 2016, sum er nakað minni enn undanfarin ár. Í øðrum framkomnum londum eru ikki útlit til munandi búskaparvøkstur næsta árið (sí talvu 4).

**Talva 4. Árligur vøkstur í BTÚ í føstum prísum 2013-2017 býtt á øki**

| *% um árið í føstum prísum* | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|
| USA | 1,5 | 2,4 | 2,4 | 2,0 | 2,2 |
| Evruøkið | -0,3 | 0,9 | 1,5 | 1,4 | 1,7 |
| Stóra Bretland | 1,7 | 2,9 | 2,2 | 2,1 | 2,0 |
| Týskland | 0,4 | 1,6 | 1,4 | 1,3 | 1,7 |
| Japan | 1,6 | -0,1 | 0,4 | 0,8 | 0,6 |
| Heimsbúskapurin | 3,3 | 3,4 | 3,0 | 3,0 | 3,3 |

*Viðm.: Tølini fyri 2016 og 2017 eru metingar.*
*Kelda: OECD Interim Economic Outlook, 18. februar 2016, og IMF World Economic Outlook Update, 19. januar 2016.*

Fleiri orsøkir eru til, at stígur er komin í búskapargongdina í fleiri týðandi londum. Millum aðrar kunnu nevnast tvørrandi eftirspurningur, at vinnulív og húsarhald gera færri íløgur enn áður væntað og at órógv var á fíggjarmarknaðum við ársbyrjan 2016. Millum annað í USA gera fyritøkur færri íløgur enn væntað, sum millum annað kemur av lækkandi oljuprísum.

Harafturat er virðið á gjaldoyranum í USA, dollaranum, hækkað, sum hevur ávirkað kappingarførið innan útflutningsvinnur í USA. Eftirspurningurin í flestu londum í Vesturheiminum er framvegis lágur, og hann er ikki vaksin stórvegis síðstu 1-2 árini, eins og roknað hevur verið við. Eitt tekin um lága vøksturin í flestu londum í Vesturheiminum og tvørrandi eftirspurningin er, at heimshandilin av vørum minkaði í 2015, sum ikki er komið fyri síðani búskaparkreppuna í 2009.

Harafturat kann nevnast, at prísirnar á rávørum, harundir olju, eru lækkaðir munandi, sum ávirkar lond ymiskt alt eftir, hvussu heft lond eru at oljuvinnu og íløgum í olju- og ráevnisvinnu. Prísurin á olju er lækkaður úr umleið 120 $ fyri fatið í juni 2014 til umleið 40 $ fyri fatið, sum svarar til eina lækking á umleið 65%. Príslækkingin er bæði komin av størri útboði og av, at eftirspurningurin ikki veksur eins nógv og undanfarin ár.

Flestu lond hava fyrimunir av, at olju- og ráevnisprísir lækka, men fyri summi lond kunnu trupulleikar standast av, at olju- og ráevnisprísir lækka. Hetta kemur av, at útflutningsvirðið lækkar, íløgurnar minka í oljuvinnuni og almennu inntøkurnar frá skattum og avgjøldum á olju- og ráevnisvinnu lækka. Stóra príslækkingin á olju hevur havt við sær, at inntøkurnar eru lækkaðar fyri lond, sum framleiða og útflyta olju, meðan tær eru hækkaðar fyri lond, sum innflyta nógva olju.

Dømi um lond, har ið ráevnis- og oljuvinna eru týðandi vinnur eru Noreg, Danmark, USA, Russland, Kanada og Brasilia. Hesi lond hava trupulleikar av, at oljuprísir lækka munandi, av tí at færri íløgur verða gjørdar í olju- og ráevnisvinnu, at útflutningsvirðið lækkar og almennu inntøkurnar frá skattum og avgjøldum á olju- og ráevnisvinnu lækka.

Í flestu øðrum londum eru lægri olju- og ráevnisprísir kortini ein fyrimunur fyri búskapin. Lægri olju- og ráevnisprísir stimbra keypsorku og eftirspurning frá húsarhaldum og vinnulívi og stimbra harvið búskapin sum heild. Hinvegin er greitt, at olju- og ráevnisprísir eru lækkaðir millum annað orsakað av, at útlitini fyri munandi búskaparvøkstri næstu árini eru versnað síðsta hálva árið. Flestu serfrøðingar í olju- og ráevnisprísum rokna við, at prísirnir hækka líðandi næstu 1-2 árini. Roknað verður kortini ikki við, at prísirnir í bræði hækka á sama støði, sum var frá 2011 til 2014.

**Talva 5. Árligur vøkstur í BTÚ í ársins prísum 2010-2017 býttur á lond**

| *% um árið í ársins prísum* | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | *2016* | *2017* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Føroyar | 7,0 | 2,4 | 3,0 | 7,5 | 5,8 | 6,2 | *5,3* | *2,9* |
| Danmark | 4,9 | 1,9 | 1,8 | 1,1 | 1,9 | 3,2 | *3,3* | *3,9* |
| Ísland | 1,8 | 5,1 | 4,4 | 5,8 | 5,9 | 10,6 | *8,8* | *8,3* |
| Noreg | 6,6 | 7,8 | 6,2 | 3,5 | 2,6 | 0,3 | *3,8* | *4,4* |
| Stóra Bretland | 4,7 | 4,1 | 2,8 | 4,2 | 4,7 | 3,6 | *3,6* | *3,8* |
| USA | 3,8 | 3,7 | 4,1 | 3,1 | 4,1 | 3,4 | *4,1* | *4,3* |
| Evruøkið | 2,7 | 2,7 | 0,4 | 1,0 | 1,8 | 2,7 | *2,8* | *3,3* |
| OECD-miðal | 4,4 | 3,8 | 2,8 | 2,6 | 3,5 | 3,5 | *3,8* | *4,2* |

*Viðm.: Tølini fyri 2016 og 2017 eru metingar.*
*Kelda: OECD, Hagstovan og metingar hjá Fíggjarmálaráðnum.*

Búskaparvøksturin í Evropa var umleið 1,5% í 2015, og í løtuni eru ikki útlit til størri vøkstur í 2016. Í USA og Stóra Bretlandi var nakað størri vøkstur á omanfyri 2% í 2015, og útlit eru til vøkstur á umleið 2% í 2016. Metingar av búskaparvøkstri hjá OECD og IMF í fleiri týðandi londum eru vístar í talvu 4 omanfyri. Í talvu 5 síggjast metingar av vøkstri í ársins prísum fyri útvald lond.

Óvissan um búskapargongdina næstu 1-2 árini og búskaparstøðuna sum heild í Evropa, Kina og øðrum menningarlondum og órógvið á fíggjarmarknaðum merkir eisini, at vandi er fyri lægri vøkstri enn væntað næstu 1-2 árini. Í Evropa eru álvarsligar politiskar óvissur og avbjóðingar, millum annað viðvíkjandi fólkaatkvøðuni í Stórabretlandi um ES-limaskapin og um londini í ES eru før fyri at loysa avbjóðingina, sum er íkomin av streyminum av flóttum og tilflytarum til Evropa.

Eydnast ikki londunum í felag at loysa avbjóðingarnar, sum eru íkomnar av økta streyminum av flóttum og tilflytarum, sum leita móti Evropa, ella atkvøða bretar fyri, at Stóra Bretland fer úr ES-samstarvinum, kann roknast við, at politisk kreppa tekur seg upp í Evropa. Hetta fer óivað at ávirka allar búskapirnar í Evropa og fer at hava við sær lægri búskaparvøkstur og møguliga, at samhandilin millum londini minkar, sum eisini fer at hava við sær lægri búskaparvøkstur.

Óvissa er eisini um búskaparstøðuna í í Kina. Síðstu árini er skuldin í privatum fyritøkum og hjá húsarhaldum í stóru býunum í Kina vaksin óvanliga nógv. Fleiri serfrøðingar óttast, at prísir á fastari ogn, bústaðum og partabrøvum eru hækkaðir ov nógv av hesum og at prísirnir ikki eru grundaðar á veruleikakendar metingar av útlitum. Álvarsligt órógv hevur verið á partabrævamarknaðinum í Kina í ár, sum millum annað er komið av óvissu um støðuna í búskapinum í Kina. Spjaðir órógvið seg til bústaðarmarknaðin, húsarhald og peningastovnar í Kina, fer hetta óivað at hava við sær lægri vøkstur í Kina enn væntað.

**Talva 6. Arbeiðsloysi í % av arbeiðsfjøld, býtt á lond og ár**

| *Arbeiðsloysi í %* | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | *2016* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Føroyar | 1,3 | 3,9 | 5,8 | 7,0 | 5,6 | 4,5 | 3,8 | 2,9 | *2,5* |
| Danmark | 3,5 | 6,0 | 7,5 | 7,6 | 7,5 | 7,0 | 6,5 | 6,2 | *6,0* |
| Ísland | 3,0 | 7,2 | 7,5 | 7,1 | 6,0 | 5,4 | 5,0 | 4,3 | *4,1* |
| Noreg | 2,6 | 3,2 | 3,6 | 3,3 | 3,2 | 3,5 | 3,5 | 4,2 | *4,3* |
| Stóra Bretland | 5,7 | 7,6 | 7,9 | 8,1 | 8,0 | 7,6 | 6,2 | 5,6 | *5,5* |
| USA | 5,8 | 9,3 | 9,6 | 8,9 | 8,1 | 7,4 | 6,2 | 5,3 | *4,9* |
| Evruøkið | 7,6 | 9,7 | 10,2 | 10,2 | 11,4 | 12,0 | 11,6 | 11,0 | *10,5* |

*Viðm.: Tølini fyri 2016 eru metingar.*
*Kelda: Hagstovan og IMF.*

Talva 6 omanfyri vísir arbeiðsloysi í % av arbeiðsfjøld býtt á útvald lond. Í Evropa er framvegis høgt arbeiðsloysi í miðal, og stórur munur er á arbeiðsloysinum í Suður- og Norðurevropa. Roknast kann við høgum arbeiðsloysi í londunum í Suðurevropa fleiri ár frameftir, av tí at fortreytirnar fyri at nýggj arbeiðspláss taka seg upp ikki eru til staðar, millum annað er lágur búskaparvøkstur, lítil vøkstur í eftirspurningi og vinnufyritøkur gera fáar íløgur.

Búskapurin í Evropa og heimsbúskapurin sum heild hava síðstu árini verið stimbraðir av stuðulstiltøkum frá miðbankum og av at miðbankar hava lækkað leiðandi rentur ferð eftir ferð, soleiðis at rentustigið nú er søguliga lágt. Eingin søgulig fordømi eru um so umfatandi peningapolitisk tiltøk og so lágt rentustøðið í so langa tíð, og enn er óvist hvørja ávirkan tað fær á búskapirnar í Vesturheiminum, tá ið hesi tiltøk í framtíðini verða minkað.

Miðbankin í USA hevur givið tekin um, at rentustigið helst fer at hækka spakuliga næsta árið. Órógvið á fíggjarmarknaðum fyrsta ársfjórðing í ár og lági vøksturin í heimsbúskapinum gera tað kortini sannlíkt, at rentustøðið verður verandi óvanliga lágt næstu 1-2 árini. Miðbankin í Evropa hevur tíðliga í mars á ár givið tekin um, at ongar ætlanir eru at hækka leiðandi renturnar við verandi útlitum fyri vøkstri og arbeiðsloysi í Evropa.

## Almenn fíggjarmál

Her verður stutt hugt eftir gongdini í úrslitinum hjá landskassanum og tí almenna tilsamans síðstu árini. Fíggjarmálaráðið gav í februar 2014 út eina meting av konjunkturjavnaða úrslitinum fyri tað almenna tilsamans. Í fylgiskjali A eru dagførdar uppgerðir fyri tíðarskeiðið 2001 til 2016, og mett verður eisini leysliga um 2017. Niðurstøðan í fylgiskjali A eru í stuttum, at bygnaðarliga hallið í almenna geiranum í Føroyum sannlíkt er umleið 1% av BTÚ ella umleið 150 mió. kr.

**Mynd 15**

**Úrslit landskassans, mió. kr., 1997 til 2021**




Viðm.: Tølini fram til og við 2014 eru roknskapartøl. Tølini fyri 2015 eru mett tøl.
Tølini fyri 2016 eru játtanartøl, og tølini fyri 2017 og frameftir eru úr uppskotinum til játtanarkarmar.
* Úrslitið fyri 1998 er ávirkað av eftirgeving av donskum ríkislánum til Føroyar á 900 mió. kr.
Kelda: Gjaldstovan.

Búskaparráðið hevur eisini mett um haldførið í føroyska búskapinum. Metingarnar hjá Búskaparráðnum leggja upp fyri væntaðum broytingum í fólkasamansetingini í framtíðini. Harafturat leggja metingarnar hjá Búskaparráðnum upp fyri, at tað almenna í løtuni fær skattainntøkur frá pensjónsinngjøldum og –útgjøldum.

Í framtíðini fer tað almenna ikki at fáa skattainntøkur bæði frá pensjónsinngjøldum og –útgjøldum. Skatturin av pensjónsinngjøldum ávirkar tí metingarnar av langtíðarhaldførinum við umleið 300 mió. kr., eins og nevnt í nýggjastu frágreiðingini hjá Búskaparráðnum.

Metingarnar hjá Fíggjarmálaráðnum og Búskaparráðnum vísa, at haldførið í almenna búskapinum sum heild ikki er gott, serliga um lagt verður upp fyri væntaðum broytingum í fólkasamanseting í framtíðini. Tí er neyðugt at seta í verk ítøkilig tiltøk næstu árini fyri at bøta um javnvágina millum almennu inntøkurnar og útreiðslurnar.

Verður hetta ikki gjørt, kann roknast við, at almenna skuldin fer at vaksa, sum frá líður. Tí kann eisini roknast við, at almenna kredittvirðið versnar, sum frálíður, og at rentustigið og rentuútreiðslur hjá landinum tí fara at hækka. Hetta fer at gera tað torførari at fáa javnvág millum almennu útreiðslurnar og inntøkurnar og fer helst eisini at avmarka møguleikarnir at reka sjálvstøðugan fíggjarpolitikk í framtíðini.

Mynd 15 omanfyri vísir gongdina í inntøkum og útreiðslum hjá landskassanum og í RLÚ-úrsliti síðani 1997 við fyribils mettum tølum fyri 2015, játtanartølum fyri 2016 og tølum fyri 2017 úr uppskotinum til játtanarkarmar. Á myndini sæst, at at útreiðslurnar hjá landskassanum eru vaksnar meira enn inntøkurnar síðani 2007 og at landskassin hevur havt hall øll árini síðani 2008.

Myndin vísir eisini, at inntøkurnar hjá landskassanum ávirkast nógv av konjunkturgongdini í samfelagnum, meðan útreiðslurnar eru støðugari. Á myndunum 16 og 17 sæst, at skattatrýstið er lækkað síðani 2007, meðan lutfallið millum almennu útreiðslurnar og BTÚ hevur verið meira støðugt.

Mynd 16

Almennar inntøkur og útreiðslur (land, kommunur og sosialir grunnar), % av BTÚ, 1998 til 2013




Kelda: Hagstovan.

Mynd 18 vísir gongdina í bruttoskuld og innistandandi hjá landinum. Gongdin síðstu árini, har ið inntøkurnar hjá landskassanum frá skattum og avgjøldum ikki eru vaksnar í sama mun sum útreiðslurnar, hevur givið eina verri javnvág millum inntøkur og útreiðslur hjá landinum, sum sæst aftur sum vaksandi lánsbrævaskuld síðani 2008, sí mynd 18.

Mynd 17

Skattainntøkur tess almenna í mió. kr., 1998 til 2013




Kelda: Hagstovan.

Fyri haldførið á fíggjarpolitikkinum hevur tað týdning, at nettoskuldin yvir longri áramál ikki veksur skjótari enn samlaðu inntøkurnar í samfelagnum, sum skulu fíggja rentuútreiðslurnar av skuldini. Hetta merkir, at nettoskuld í % av BTÚ ikki hækkar støðugt yvir tíð, tá ið atlit eisini eru tikin at konjunkturstøðuni.

Mynd 18

Landskassans lánsbrævaskuld og innistandandi í mió. kr. og % av BTÚ, 1997 til 2015




Kelda: Gjaldstovan.

Talva 7 vísir úrslit fyri tað almenna tilsamans. Síðstu árini hevur hall verið í almenna geiranum í flestu londum í Vesturheiminum. Í so máta er støðan ikki stórt øðrvísi í Føroyum sammett við í øðrum londum. Kortini er greitt, at smáir búskapir, sum eru nógv tengdir at tilfeingisvinnum, eru meira viðbreknir sammett við størri lond. Hetta merkir, at smá lond hava fyrimunir av at hava lutfalsliga lítla skuld og gott kredittvirði og av at tað almenna hevur búskaparligt rásarúm til at stimbra búskapin, tá ið lágkonjunkturur er ella tá ið stoytir og kreppur raka búskapin.

**Talva 7. Úrslit fyri tað almenna tilsamans í % av BTÚ, býtt á lond og ár**

| *Úrslit hjá tí almenna, % av BTÚ* | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Føroyar | 2,1 | -2,8 | -4,8 | -3,5 | -2,1 | -2,1 | -2,5 | *-1,6* | *-0,1* |
| Danmark | 5,0 | 3,2 | -2,8 | -2,7 | -2,1 | -3,7 | -1,1 | 1,8 | -2,7 |
| Ísland | 4,9 | -13,1 | -9,7 | -9,7 | -5,6 | -3,7 | -1,7 | -0,2 | 1,3 |
| Stóra Bretland | -3,0 | -5,1 | -10,8 | -9,7 | -7,6 | -7,8 | -5,7 | -5,7 | -4,2 |
| USA | -2,9 | -6,7 | -13,1 | -10,9 | -9,6 | -7,9 | -4,7 | -4,1 | -3,8 |

*Viðm.: Tølini fyri almenna úrslitið í Føroyum í 2014 og 2015 eru metingar og skulu lesast við fyrivarni.*
*Kelda: Hagstovan og IMF.*

Tað almenna í Føroyum er ikki serstakliga skuldarbundið sammett við onnur lond í Vesturheiminum. Bruttoskuldin hjá landinum er 30-35% av BTÚ, og kommunurnar hava bruttoskuld á 5-10% av BTÚ. Til sammetingar er almenna bruttoskuldin í londunum í Evropa 90-95% av BTÚ í miðal, og almenna bruttoskuldin í Danmark er 45-50% av BTÚ.

Samanumtikið er almenna skuldin í Føroyum neyvan órógvandi høg. Ein av lærunum frá fíggjar- og búskaparkreppuni, sum byrjaði í 2008, er kortini, at almenna skuldin kann hækka serstakliga skjótt og ógvusliga, um álvarsligir stoytir raka búskapin og kreppur taka seg upp. Í tílíkum førum er umráðandi at hava búskaparligt rásarúm til at seta tiltøk í verk og stimbra búskapin.

Ein óvissa viðvíkjandi almenna búskapinum næstu árini er sjálvsagt, at rentustigið á skuldini er óvanliga og søguliga lágt í løtuni. Roknast kann við, at rentustigið hækkar nakað næstu árini, hóast tað er at kalla ógjørligt at meta um hvussu skjótt renturnar fara at hækka og hvussu nógv. Tá ið rentustigið hækkar, fer hetta sjálvsagt at kosta landi og kommunum pening í hægri rentuútreiðslum. Bruttoskuldin hjá landinum er um 5 mia. kr. Hvørt %, sum rentustigið hækkar næstu árini, fer tí at kosta landinum umleið 50 mió. kr. brutto árliga í hægri rentuútreiðslum á skuldini.

## Uppskotið til játtanarkarmar

Talvan niðanfyri vísir uppskotið til játtanarkarmar fyri 2017-2021 útgreinað.

**Talva: Útgreinaðir játtanarkarmar fyri 2017-2021**

| *Mió. kr.* | **2017** | **2018** | **2019** | **2020** | **2021** |
|---|---|---|---|---|---|
| Rakstrarútreiðslur, §1-§17: | | | | | |
| §1 Løgtingið | 53,4 | 53,6 | 55,8 | 55,0 | 54,2 |
| §2 Løgmansfyrisitingin | 37,0 | 36,8 | 36,6 | 36,5 | 36,3 |
| §3 Fíggjarmál | 304,2 | 310,9 | 317,5 | 324,0 | 330,5 |
| §5 Fiskivinnumál | 163,2 | 158,4 | 157,6 | 156,9 | 156,2 |
| §7 Mentamál | 1.055,4 | 1.053,9 | 1.055,1 | 1.055,8 | 1.056,5 |
| §11 Heilsu- og innlendismál | 1.063,1 | 1.068,5 | 1.072,8 | 1.073,3 | 1.074,8 |
| §12 Almannamál | 1.448,5 | 1.456,6 | 1.462,9 | 1.471,4 | 1.479,5 |
| §13 Uttanríkis- og vinnumál | 102,2 | 101,9 | 101,6 | 101,3 | 101,0 |
| §17 Samferðslumál | 235,4 | 234,2 | 233,1 | 231,9 | 230,8 |
| **Rakstrarútreiðslur tilsamans** | **4.462,2** | **4.474,9** | **4.493,0** | **4.506,1** | **4.519,7** |
| | | | | | |
| **Løguútreiðslur, §1-§17** | **280,0** | **330,0** | **370,0** | **350,0** | **350,0** |
| **Rentuútreiðslur, netto** | **2,6** | **9,7** | **17,0** | **21,0** | **25,0** |
| | | | | | |
| **Inntøkur** | **4.794,8** | **4.923,6** | **4.994,7** | **5.066,2** | **5.134,0** |
| | | | | | |
| **RLÚ-úrslit** | **50,0** | **109,1** | **114,7** | **189,0** | **239,3** |

## Uppskotið til játtanarkarmar býtt á greinar

Niðanfyri er uppskotið til játtanarkarmar fyri árini 2017-2021 býtt á greinar. Tølini fevna um øll játtanarsløg undantikið løgujáttanir, t.e. rakstrarjáttanir, stuðulsjáttanir og lógarbundnar játtanir. Løguætlanin er lýst serskilt í skjalinum.

**Rakstrarkarmar fyri § 1 Løgtingið 2017-2021**

| **Rakstrarkarmar fyri § 1 Løgtingið 2017-2021** | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **§ 1 Løgtingið, *mió. kr.*** | **FL 2016** | **Æ 2017** | **Æ 2018** | **Æ 2019** | **Æ 2020** | **Æ 2021** |
| **Rakstrarkarmur** | **53,1** | **53,4** | **53,6** | **55,8** | **55,0** | **54,2** |

### Framskrivingar

Raksturin er framskrivaður soleiðis í 2017:

- Løgtingsval var í 2015. Tí varð framskrivað við bíðiløn til løgtingsfólk í 2016. Eingin framskriving av bíðiløn er í 2017.
- Framskrivað er við sáttmálabundnum lønarhækkingum á almenna sáttmálaøkinum, sum eru avtalaðar fram til 1. oktober 2017.

**Rakstrarkarmar fyri § 2 Løgmansfyrisitingin 2017-2021**

| **Rakstrarkarmar fyri § 2 Løgmansfyrisitingin 2017-2021** | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **§ 2 Løgmansfyrisitingin, *mió. kr.*** | **FL 2016** | **Æ 2017** | **Æ 2018** | **Æ 2019** | **Æ 2020** | **Æ 2021** |
| **Rakstrarkarmur** | **37,9** | **37,0** | **36,8** | **36,6** | **36,5** | **36,3** |

## Framskrivingar

Raksturin er framskrivaður soleiðis í 2017:

- Løgtingsval var í 2015, og tí var framskrivað við bíðiløn til landsstýrisfólk í 2016. Eingin framskriving av bíðiløn er í 2017.
- Drotningavitjan verður væntandi í 2016. Hendan er ikki framskrivað í 2017.
- Framskrivað er við sáttmálabundnum lønarhækkingum á almenna sáttmálaøkinum, sum eru avtalaðar fram til 1. oktober 2017.

## Raðfestingar

Í 2017 verður fólkaatkvøða hildin um stjórnarskipan Føroya, ið løgmaður er farin undir at fyrireika. Tað verður Heilsu- og innlendismálaráðið, ið kemur at taka sær av tí praktiska í sambandi við fólkaatkvøðuna.

## Tillagingar

Arbeitt verður áhaldandi við at tálma almenna útreiðsluvøksturin, og lagt verður upp fyri, at stovnar og stjórnarráð bera sín part av hesum.

**Rakstrarkarmar fyri § 3 Fíggjarmál 2017-2021**

| Rakstrarkarmar fyri § 3 Fíggjarmál 2017-2021 | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **§ 3 Fíggjarmál, *mió. kr.*** | **FL 2016** | **Æ 2017** | **Æ 2018** | **Æ 2019** | **Æ 2020** | **Æ 2021** |
| **Rakstrarkarmur** | **293,3** | **304,2** | **310,9** | **317,5** | **324,0** | **330,5** |

## Framskrivingar

Raksturin er framskrivaður soleiðis í 2017:

- Tænastumannaeftirlønir innan ymsar fakbólkar, við mettum vøkstri av fráfarandi tænastumonnum.
- Eftirløn landsstýrismanna, við mettum vøkstri av fyrrverandi landsstýrisfólkum, ið fara um pensjónsaldur.
- Nýggi Landsbanki Føroya verður eftir ætlan stovnaður í 2016. Játtanin verður framskrivað fyri árið 2017. Samlaða játtanin samsvarar við ta játtan, ið varð flutt til aðrar stovnar, tá ið gamli Landsbankin varð avtikin í 2013. Hesar játtanir og uppgávur verða fluttar frá somu stovnum til nýggja Landsbanka Føroya, tó undantikið tann partur, ið fluttur er til Fróðskaparsetur Føroya.
- SALT mentanarhúsið verður eftir ætlan tikið í nýtslu í 2016. Landsins partur av játtanini fyri 2017 er framskrivaður fyri fult ár.
- Stuðul til rentuútreiðslur er framskrivaður við verandi rentustøði.
- Framskrivað er við sáttmálabundnum lønarhækkingum á almenna sáttmálaøkinum við teimum lønarhækkingum, sum eru avtalaðar fram til 1. oktober 2017.

## Raðfestingar

Landsstýrið hevur sett sær sum mál at fáa Føroyar millum fremstu lond, tá ið umræður talgilding. Hetta er liður í at gerast eitt sjálvbjargið og tíðarhóskandi samfelag.

Millum størstu raðfestingar í 2017 er tí verkætlanin Talgilding Føroya, ið fer at geva øllum føroyingum møguleika fyri at avgreiða øll síni formligu viðurskifti við talgildum loysnum.

Fyrsta stig er at fáa framdan eina føroyska talgilda undirskrift/talgildan samleika. Hetta fer at lætta um bæði hjá borgarum, vinnu og tí almenna og geva møguleika fyri munandi lættari og skjótari avgreiðslu av formligum viðurskiftum.

Talgildingin fer sum heild at nútíðargera og rationalisera umsiting og tænastur í samfelagnum og gera Føroyar kappingarførar, tá ið umræður talgilt undirstøðukervi.

Sambært ætlan verður talgilda undirskriftin tøk hjá øllum føroyingum í 2017.

Landið setur 20 mió. kr. av til endamálið í 2017. Í 2015-2016 hava føroysku peningastovnarnir játtað at seta 9 mió. kr. í verkætlanina Talgildu Føroyar.

Arbeiðið hjá skattanevndini verður gjørt liðugt. Lønarnevnd verður harafturat sett at gera uppskot til felags almenna lønartalvu, og varskógvaraskipan fyri fólk í almennum starvi verður sett í verk.

**Tillagingar**

Í sambandi við at pensjónsnýskipan verður framd fyri allar føroyingar er hóskandi, at lóg um tænastumannaeftirløn eisini verður endurskoðað. Í hesum sambandi kunnu ávísar tillagingar gerast, ið gera skipanina meira tíðarhóskandi, smidliga og fer at eggja fólki, ið hava hug og møguleika fyri at arbeiða longur. Hetta kann eisini vera við til at tálma útreiðsluvøkstrinum í tænastumannaeftirlønum.

Arbeitt verður áhaldandi við at tálma almenna útreiðsluvøksturin, og lagt verður upp fyri, at stovnar og stjórnarráð bera sín part av hesum.

**Rakstrarkarmar fyri § 5 Fiskivinnumál 2017-2021**

| **Rakstrarkarmar fyri § 5 Fiskivinnumál 2017-2021** | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **§ 5 Fiskivinnumál, *mió. kr.*** | **FL 2016** | **Æ 2017** | **Æ 2018** | **Æ 2019** | **Æ 2020** | **Æ 2021** |
| **Rakstrarkarmur** | **160,2** | **163,2** | **158,4** | **157,6** | **156,9** | **156,2** |

## Framskrivingar

Framskrivaða játtanin av verandi virkseminum fyri 2017 er lægri sammett við 2016. Raksturin er framskrivaður soleiðis í 2017:

- Peningur varð settur av til MOB-bátar hjá Vørn í 2016. Hetta er ikki framskrivað í 2017.
- Í 2016 varð peningur settur av til nevndina, sum skal gera tilmæli um nýskipan av fiskivinnuni. Hetta er ikki framskrivað í 2017.
- Játtanin til flutningsstuðul verður framskrivað í 2017.
- Framskrivað er við sáttmálabundnum lønarhækkingum á almenna sáttmálaøkinum, sum eru avtalaðar fram til 1. oktober 2017.

## Raðfestingar og nýskipanir

Landsstýrið og landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum hava sett sær hesi høvuðsmál og raðfestingar komandi árini:

- Nýggj skipan fyri fiskivinnuna skal setast í verk.
- Nýtt havrannsóknarskip verður bygt, og vísindaliga granskingin og vitanin um alt okkara livandi tilfeingi og okkara vistskipan í Norðurhøvum skal áhaldandi styrkjast.
- Munandi átøk verða gjørd til fiskivinnuroyndir, gransking og verkætlanir, ið kunnu leggja grundarlag fyri burðardygd og munandi virðisvøkstri úr tilfeinginum.
- Altjóða-, fleirtjóða- og tvílandasamráðingar og samstarv verða miðvíst ment og útbygd.
- Nýggj og greið mál skulu setast og fremjast fyri landbúnaðin og landbúnaðarpolitikkin.
- Tilbúgvingin og bjargingartænastan skulu útbyggjast.
- Fiskiveiðieftirlitið skal støðugt mennast.
- Umsitingin av rættindum, loyvum, góðkenningum, hagtalsskipanum v.m. verður skipað hjá undirliggjandi stovni undir Fiskimálaráðnum, og kæruskipanin verður endurskoðað.

Eftir ólavsøku í ár verður farið undir politisku viðgerðina av tilmæli frá nevndini, ið er sett at gera uppskot til nýggja skipan fyri fiskivinnuna. Fiskimálaráðið fyrireikar seg til samráðingar og at seta í verk nýskipanina. Hetta fer at fáa týdning fyri raðfestingar og karmar frameftir undir fiskivinnumálum, men enn er ov tíðliga at siga nakað ítøkiligt.

Løgtingið samtykti í desember 2015 dagførda verklagslóg fyri nýggjum havrannsóknarskipi. Farið verður í ár undir at bjóða bygginguna út, og samlaða játtanin er sett á løguætlan landsins.

Landsstýrið hevur sett sær sum eitt høvuðsmál at gera nýskipanir og ítøkilig átøk, ið kunnu leggja grundarlagið fyri burðardygd og munandi virðisvøkstri burtur úr náttúrutilfeinginum.

Í tí sambandi verða undir fiskivinnumálum settar av umleið 7 mió. kr. afturat til fiskivinnuroyndir, aðrar royndir og gransking í breiðari høpi, soleiðis at beinleiðis játtanin til hesi endamál hjá Fiskimálaráðnum fer upp um 10 mió. kr. í 2017.

Endamálið er, at vinnan í minsta lagi letur somu fígging, og at samfígging eisini kann fáast úr grunnum og skipanum bæði uttanlands og í Føroyum.

Tískil verður eitt munandi stig tikið til at menna vinnuliga gransking, royndir og verkætlanir, og ætlanin er at halda fram og taka onnur stig næstu árini. Landsstýrið arbeiðir við at endurskoða og samskipa tær skipanir, ið fíggja og hava til endamáls at menna gransking og vinnuliga nýskapan

Høvuðsmálini fyri granskingini, royndunum og verkætlanunum í fiskivinnuni eru m.a.:

- Burðardyggur fiskiskapur
- At alt tilfeingið verður betur gagnnýtt og virðisøkt
- At størri virðisøking verður skapt í Føroyum í øllum liðum í vinnuni
- At alt av fiskinum verður fingið til lands og kemur til høldar
- At góðska og góðskuváttanir kunnu mennast í øllum liðum
- At marknaðaratgongd og marknaðarføring kunnu betrast
- At føroyskir førleikar verða mentir í tøkni, veiði, framleiðslu, veitingum, tænastum og sølu

Royndir og gransking fevna eisini um landbúnaðarøkið. Meira skal fáast úr tilfeinginum, bæði innan matvørur, klædnavørur og líknandi. Brúksskylda skal setast til tey, ið umsita lendið og lendisskipan verður gjørd fyri alt landið.

Á tilbúgvingarøkinum verður allur samskiftisútbúnaðurin dagførdur, nýggju tyrlurnar verða báðar komnar til landið í ár, og ávísar átrokandi íløgur eru gjørdar hjá Vørn. Ætlanin er støðugt at dagføra og samskipa tilbúgving, bjarging og eftirlit.

Innan dagligu umsitingina av fiskivinnuni hevur Fiskimálaráðið, sum stjórnarráð, flutt sjálva loyvisskipanina til undirliggjandi stovn. Tá øll loyvisumsitingin er flutt eins og arbeiðið, ið verður sett í samband við hana, skal skipanin dagførast, soleiðis at skipanin møtir framtíðar krøvum viðvíkjandi loyvisyvirlitum, hagtølum og øllum viðkomandi upplýsingum, ið snúgva seg um fiskiveiðina í síni heild.

### Tillagingar

Arbeitt verður áhaldandi við at tálma almenna útreiðsluvøksturin, og lagt verður upp fyri, at stovnar og stjórnarráð bera sín part av hesum.

**Rakstrarkarmar fyri § 7 Mentamál 2017-2021**

| **Rakstrarkarmar fyri § 7 Mentamál 2017-2021** | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **§ 7 Mentamál, *mió. kr.*** | **FL 2016** | **Æ 2017** | **Æ 2018** | **Æ 2019** | **Æ 2020** | **Æ 2021** |
| **Rakstrarkarmur** | **1.027,2** | **1.055,4** | **1.053,9** | **1.055,1** | **1.055,8** | **1.056,5** |

## Framskrivingar

Raksturin er framskrivaður innan hesi øki í 2017:

- Fólkaskúlin
- Miðnámsútbúgvingar
- Skúlatilboð til ung við breki
- Fróðskaparsetur Føroya
- Lestrarstuðul
- Stuðul til fólkaskúlar
- Framskrivað er við sáttmálabundnum lønarhækkingum á almenna sáttmálaøkinum, sum eru avtalaðar fram til 1. oktober 2017

## Raðfestingar

Samgongan hevur sett sær sum yvirskipað mál at raðfesta útbúgving og mentan. Hetta er alneyðugt, ynskja vit at venda skeiva kyns- og aldursbýtinum í landinum og skapa trivnað sum heild.

Komandi trý ára skeiðið verður lestrarstuðulin munandi bøttur, soleiðis at vit gerast kappingarfør við grannalondini, bæði í mun til lestrarstuðul til hægri lestur, korini hjá lesandi við børnum og í mun til lestrarbústaðir.

Eisini hevur samgongan sett sær fyri at økja játtanina til Mentanargrunnin komandi trý árini, so hann kemur upp á eitt nøktandi støðið.

Harumframt verða átøk framd, sum styrkja barna- og ungdómsøkið, bæði innan málsliga og námsfrøðiliga førleikamenning og menning innan skúlaverkið.

Í 2017 er eitt nú ætlanin at gera hesar raðfestingar:

- Nýggjar útbúgvingar verða settar á stovn
- Stuðulin til lesandi verður hækkaður
- Stuðulin til mentan og list verður styrktur
- Savnsøkið verður raðfest

**Tillagingar**

Arbeitt verður áhaldandi við at tálma útreiðsluvøksturin við umskipanum og øðrum tillagingum í rakstrinum, serliga innan hesi øki:

- Fólkaskúla
- Miðnámsskúlar
- Hægri útbúgvingar
- Lestrarstuðul

**Rakstrarkarmar fyri § 11 Heilsu og innlendismál 2017-2021**

| **Rakstrarkarmar fyri § 11 Heilsu- og innlendismál 2017-2021** | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **§ 11 Heilsu- og innlendismál, *mió. kr.*** | **FL 2016** | **Æ 2017** | **Æ 2018** | **Æ 2019** | **Æ 2020** | **Æ 2021** |
| **Rakstrarkarmur** | **1.038,0** | **1.063,1** | **1.068,5** | **1.072,8** | **1.073,3** | **1.074,8** |

## Framskrivingar

Raksturin er framskrivaður soleiðis í 2017:

- Heilsutrygdarveitingar verða framskrivaðar vegna størri og fleiri veitingar.
- Serstakur sjúkrahúsheilivágur verður framskrivaður orsakað av nýggjum og betri heilivági og av tí, at fleiri fólk verða sett í viðgerð.
- Serviðgerð uttanlands verður framskrivað orsakað av fleiri og betri viðgerðarmøguleikum.
- Sjúklingatryggingin verður framskrivað, tí talið av tryggingarmálum hækkar.
- Framskrivað er við sáttmálabundnum lønarhækkingum á almenna sáttmálaøkinum við teimum lønarhækkingum, sum eru avtalaðar fram til 1. oktober 2017.

## Raðfestingar

Peningur verður settur av til økt skurðlinjuvirksemi á Landssjúkrahúsinum, eins og samskipanin av útbúgvingini í sjúkrarøktarfrøði verður raðfest. Harumframt verður tænastan hjá Gigni til børn millum 2 og 7 ár víðkað nakað afturat. Arbeitt verður við at fáa fleiri serlæknar og at menna sjúkrahúsini.

FarGen verkætlanin verður raðfest. Endamálið við FarGen verkætlanini er at koma til gagns í granskingarverkætlanum sum heild og at kunna nýtast í heilsuverkinum til fyribyrging og betri viðgerð, har úrslitini kunna koma føroyingum til góðar í føroyska heilsuverkinum.

Arbeitt verður við at menna økispsykiatri, endurvenjing, demensøkið og aðrar tænastur.

Arbeiðið við grønari orku heldur áfram, eins og útoyggjar og náttúru- og umhvørvisvernd verður raðfest.

## Tillagingar

*Rationaliseringar innan heilsuøkið*
Neyðugt verður at fremja tillagingar á heilsuøkinum fyri at røkka virksemisvøkstrinum. Herundir verður arbeitt við at málrætta heilsutrygdarveitingarnar.

Arbeitt verður áhaldandi við at tálma almenna útreiðsluvøksturin, og lagt verður upp fyri, at stovnar og stjórnarráð bera sín part av hesum.

**Nýskipanir**

*Menningarætlan fyri heilsuverkið*
Farið er undir arbeiðið við eini menningarætlan fyri heilsuverkið. Orsakað av, at arbeiðið er sera víðfevnt og fjøltáttað, er tað skipað í pørtum. Fyrsti partur snýr seg um Menningarætlanina fyri sjúkrahúsverkið, sum í høvuðsheitum inniheldur hesir tættir:

- Tilmæli um, hvørjar viðgerðir skulu vera í føroyska sjúkrahúsverkinum og hvussu hesar skulu samskipast millum sjúkrahúsini.
- Ætlan fyri, hvussu heilsustarvsfólk kunnu útvegast og mennast til føroyska sjúkrahúsverkið.
- Meting av fíggjarliga tørvinum fyri alt sjúkrahúsverkið, sum gevur neyðugt rásarúm at veita heilsutænastur á fremsta stigi, og neyðugu starvsfólkaorkuna til tess.

*Onnur øki innan §11*
Í øðrum lagi verður hildið fram við at menna tann partin av heilsuverkinum, sum er uttanfyri sjúkrahúsverkið, til dømis kommunulæknaskipanina og skipanina við heilsudeplum í heilsuøkjum. Ætlanin er, at størri partur av heilsuveitingunum til borgarar skal kunna fara fram á heilsudeplunum. Á heilsudeplunum fara at starvast viðkomandi heilsustarvsfólk.

**Rakstrarkarmar fyri § 12 Almannamál 2017-2021**

| Rakstrarkarmar fyri § 12 Almannamál 2017-2021 | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| § 12 Almannamál, *mió. kr.* | FL 2016 | Æ 2017 | Æ 2018 | Æ 2019 | Æ 2020 | Æ 2021 |
| **Rakstrarkarmur** | **1.440,0** | **1.448,5** | **1.456,6** | **1.462,9** | **1.471,4** | **1.479,5** |

## Framskrivingar

Raksturin er framskrivaður soleiðis í 2017:

- Fólkapensjón, vegna væntandi hægri tal av fólkapensjónistum
- Arbeiðsfremjandi tiltøk
- Dagpeningaskipanin
- Virknis- og umlættingardepilin á Sandi letur upp í 2016, og játtanin í 2017 er tí framskrivað til fult virksemi
- Almannamálaráðið og Mentamálaráðið samstarva um at menna fleiri tilboð innanfyri serliga skipað miðnám. Játtan er til endamálið í 2016, og er í 2017 framskrivað til fult virksemi.
- Framskrivað er við sáttmálabundnum lønarhækkingum á almenna sáttmálaøkinum, sum eru avtalaðar fram til 1. oktober 2017

## Raðfestingar

Samgongan hevur sett sær fyri at menna tænasturnar til fólk við serligum avbjóðingum, minka um bíðilistar og miðvíst at tryggja, at øll fáa eitt virðiligt bústaðar- ella stovnstilboð.

Komandi 4 árini verða settar 60 mió. kr. av til bygging og útvegan av bústovnum. Ætlanin er lutvíst at dagføra verandi bygningar og lutvíst at byggja nýtt til fólk við serligum tørvi, eitt nú við menningartarni og autismu. Í 2017 er ætlanin at byggja ella útvega bústaðir innan almannaøkið fyri 15 mió. kr. Talan er millum annað um ein depil í Tórshavn til børn og ung við autismu og umvæling/nútímansgerð av verandi stovnum í miðstaðarøkinum.

Heildarætlanin "Harðskapur í parløgum" verður eftirmett og heildarætlanin um "Kynsligan ágang" verður raðfest.

Miðað verður eftir at dagføra fyritíðarpensjónina.

## Tillagingar

Dagpeningaskipanin verður endurskoðað við tí fyri eyga at dagføra skipanina, eins og eftirmetingin av lógini um arbeiðsfremjandi tiltøk heldur fram.

Arbeitt verður áhaldandi við at tálma almenna útreiðsluvøksturin, og lagt verður upp fyri, at stovnar og stjórnarráð bera sín part av hesum.

**Nýskipanir**

Arbeiðið við pensjónsnýskipanini verður eftir ætlan liðugt í 2016. Enn er ov tíðliga at siga í hvønn mun nýskipanin fer at ávirka játtanarkarmarnar komandi árini.

## Rakstrarkarmar fyri § 13 Uttanríkis- og vinnumál 2017-2021

| Rakstrarkarmar fyri § 13 Uttanríkis- og vinnumál 2017-2021 | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| § 13 Uttanríkis- og vinnumál, *mió. kr.* | FL 2016 | Æ 2017 | Æ 2018 | Æ 2019 | Æ 2020 | Æ 2021 |
| Rakstrarkarmur | 98,8 | 102,2 | 101,9 | 101,6 | 101,3 | 101,0 |

### Framskrivingar

Raksturin er framskrivaður soleiðis í 2017:

- Serstaka játtanin til sendistovur, ið skal nýtast til felags átøk við vinnuni at marknaðarføra føroyska vinnu á útlendskum marknaðum, heldur fram
- Maritimur tænastudepil heldur fram. Í samstarvi við vinnulív og kommunur verða maritimar tænastur, sum vinnan, land og kommunur hava at bjóða fram, greinaðar og samskipaðar og síðani marknaðarførdar á útlendskum marknaðum
- Hækkaða játtanin til P/F Visit Faroe Islands heldur fram. Umframt áhaldandi marknaðarføring av Føroyum sum ferðavinnuland verður í 2017 dentur lagdur á innlendis ferðavinnuna til tess at menna og tillaga ferðavinnutænastur kring landið til vaksandi ferðafólkatalið
- Marknaðarføring av føroyska landgrunninum til oljuleiting. Hildið verður áfram at fyrireika tilfar til komandi útboðsumfar
- Framskrivað er við sáttmálabundnum lønarhækkingum á almenna sáttmálaøkinum, sum eru avtalaðar fram til 1. oktober 2017

### Raðfestingar

*Yvirtøka av útlendingamálum*
Í 2017 verða 2 mió. kr. settar av til at fáa umsitingina av útlendingaøkinum á føroyskar hendur. Útlendingastovan skal millum annað uppbyggja førleikar, umframt menna fyrisitingarligar mannagongdir og skipanir.

Játtan til Menningarhjálp og Neyðhjálp hækkar.

### Tillagingar

Í samstarvi við vinnuna stremba vit eftir at fáa betri marknaðaratgongd fyri føroyskar vørur uttanlands. Í tí sambandi verður virksemið á sendistovunum eftirmett og møguliga umskipað soleiðis, at vit fáa sum mest burtur úr tí orku, sum er sett av til endamálið.

Arbeitt verður áhaldandi við at tálma almenna útreiðsluvøksturin, og lagt verður upp fyri, at stovnar og stjórnarráð bera sín part av hesum.

### Nýskipanir

*Kreativar vinnur*
Skapandi vinnurnar verða raðfestar, soleiðis at Føroyar kunnu fáa nógv meira burturúr tí stóra listaliga og mentanarliga tilfeinginum. Økið verður raðfest til millum annað at fyrireika eitt nýtt filmshús, sum skal leggja lunnar undir sprettandi føroysku filmsvinnuna.

**Rakstrarkarmar fyri § 17 Samferðslumál 2017-2021**

| Rakstrarkarmar fyri § 17 Samferðslumál 2017-2021 | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| § 17 Samferðslumál, *mió. kr.* | FL 2016 | Æ 2017 | Æ 2018 | Æ 2019 | Æ 2020 | Æ 2021 |
| Rakstrarkarmur | 234,3 | 235,4 | 234,2 | 233,1 | 231,9 | 230,8 |

## Framskrivingar

Raksturin er framskrivaður soleiðis fyri 2017:

- Framskrivað er við sáttmálabundnum lønarhækkingum á almenna sáttmálaøkinum, sum eru avtalaðar fram til 1. oktober 2017.

## Raðfestingar

Miðað verður eftir at fremja hesi tiltøk:

*Samferðslumálaráðið*
Samferðslumálaráðið varð sett á stovn og skipað farna heyst. Eftir ætlan verður stjórnarráðið ment í stigum soleiðis, at øll málsøki kunnu verða umsitin á fullgóðan hátt.

*Samferðsla*
Eitt væl útbygt og vælvirkandi samferðslukervi er ein fyritreyt fyri menning og trivnaði. Farið verður undir at dagføra samferðsluætlanina, sum skal galda fyri 2016-2028.

Yvir eitt 10 ára skeið frá 2014 til 2024 verða samanlagt játtaðar 400 mió. kr. til almenna partafelagið P/F Eystur- og Sandoyartunlar. Í tíðarskeiðinum 2017-2019 verða árliga játtaðar 35 mió. kr. til hesa verkætlan, og síðani verður árliga játtanin 50 mió. kr. í fimm fylgjandi ár.

Arbeitt verður við málinum viðvíkjandi innkomuvegnum til Havnar við avtalu millum Landsverk, Tórshavnar kommunu og tunnilsfelagið.

Eftir løguætlanini verður farið undir Hvalbiartunnilin í samgongutíðarskeiðinum.

*Viðlíkahald av landsvegum*
Landsvegakervið veksur alsamt í vavi, fleiri krøv verða sett til trygd og dygd til vega- og tunnilsgerð, viðlíkahald og rakstur. Ásannast má, at viðlíkahaldstørvurin er stórur.

*Akstovan*
Tað er umráðandi, at framleiðslan av nýggja koyrikortinum, sum lýkur galdandi altjóða trygdarkrøv til koyrikort sum ásett í ES reglugerð um koyrikort, verður framd og sett í verk.

*Orkunýtsla í landsins bygningum*
Arbeitt verður við loysnum at minka orkunýtsluna í landsins bygningum, sum fer at hava við sær sparingar fyri landskassan samanlagt.

*Barsilsskipanin*
Barsilsskipanin skal betrast soleiðis, at barsilstíðin stigvíst verður longd til eitt ár.

## Tillagingar

Arbeitt verður áhaldandi við at tálma almenna útreiðsluvøksturin, og lagt verður upp fyri, at stovnar og stjórnarráð bera sín part av hesum.

**Inntøkukarmar fyri § 20 Inntøkur 2017-2021**

| Inntøkukarmar fyri § 20 Inntøkur 2017-2021 | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | FL 2016 | Æ 2017 | Æ 2018 | Æ 2019 | Æ 2020 | Æ 2021 |
| § 20 Inntøkur, *mió. kr.* | 4.612,2 | 4.792,2 | 4.913,9 | 4.977,7 | 5.045,2 | 5.109,0 |

## Rentuútreiðslur og -inntøkur

Fortreytirnar fyri framskrivingina eru, at skuldin frá 2017 er óbroytt og at verandi rentustøði heldur fram. Eisini verður hildið fram við broyttari samanseting av virðisbrøvum í umsitingini av landsins gjaldføri, soleiðis at avkastið kann betrast.

## Skatta- og avgjaldsinntøkur

Í fortreytunum fyri inntøkunum verður BTÚ í ársins prísum mett at vaksa umleið 6% í 2016 og umleið 3% í 2017. Í játtanarkørmunum eru inntøkurnar framskrivaðar í ársins prísum í 2017, men árini 2018-2021 verður framskrivað í føstum prísum.

Inntøkurnar frá vanligum landsskatti og meirvirðisgjaldi eru framskrivaðar við áleið 3% í 2017 sammett við nýggjastu metingarnar fyri 2016 og umleið 1,5% árini 2018-2021.

Á teimum skatta- og inntøkujáttanum, har hetta verður hildið vera neyðugt, eru gjørdar serstakar metingar út frá fortreytunum fyri játtanina.

Eftir galdandi lóg fellur serstaki skatturin og avgjaldið frá fiskivinnuni burtur við ársenda á hvørjum ári og eisini í 2016. Partur av fortreytunum er, at inntøkur frá tilfeingisskatti og avgjald á fiskatilfeingi halda fram í 2017 og frameftir, og at tilfeingisavgjaldslóggávan verður partur av fiskivinnunýskipanini, sum arbeitt verður við.

Fyri at tryggja fíggjarliga haldførið hjá landinum verður, umframt vanligu framskrivingarnar, harafturat roknað við nýggjum inntøkum á umleið 30 mió. kr. Til dømis verður roknað við, at íløgur í virðisøking, atgongd til nýggjar marknaðir og dagføringar av fiskivinnulóggávu fara at geva landinum fleiri inntøkur.

Fyri at stimbra størri og varandi fólkavøkstri í landinum, skjýtur landsstýrið upp at lætta um fíggjarliga hjá smábarnafamiljum. Landsstýrið ynskir í hesum sambandi, at barnafrádrátturin til børn undir skúlaaldur verður hækkaður munandi, og landsstýrið hevur í játtanarkørmunum sett av 12 mió. kr. til hetta endamál í 2017. Mett verður, at hetta svarar til, at barnafrádrátturin hækkar umleið 2.700 kr. árliga fyri hvørt barn undir skúlaaldur.

## Løguætlan 2017-2021

Samlaði løgukarmurin fyri 2017 verður 280 mió. kr. Árligi løgukarmurin í løguætlanini fyri 2017-2021 er millum 280 mió. kr. og 370 mió. kr.

| **Løgukarmar fyri 2017** | |
|---|---|
| *Mió. kr.* | **2017** |
| §1 Løgtingið | 0,0 |
| §2 Løgmansfyrisitingin | 2,0 |
| §3 Fíggjarmál | 20,0 |
| §5 Fiskivinnumál | 10,0 |
| §7 Mentamál | 97,3 |
| §11 Heilsu- og innlendismál | 92,0 |
| §12 Almannamál | 15,0 |
| §13 Uttanríkis- og vinnumál | 0,0 |
| §17 Samferðslumál | 43,7 |
| **Løgujáttan tilsamans** | **280,0** |

| **Løgukarmar fyri 2017-2021** ***(mió. kr.)*** | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Ár** | **2017** | **2018** | **2019** | **2020** | **2021** |
| **Løgur § 1 - § 17 tilsamans** | **280,0** | **330,0** | **370,0** | **350,0** | **350,0** |

### Frágreiðing um løguætlanina

Niðanfyri er í høvuðsheitum greitt frá størstu løgunum næstu árini, sum eru byrjaðar ella fara í gongd í 2017.

**Skúladepilin við Marknagil (Glasir)** verður eftir ætlan gjørdur liðugur í 2017. Játtaðar verða 87 mió. kr. til hetta endamál í 2017.

Útbygging og nútíðargerð av **Landssjúkrahúsinum** heldur fram. Frá 2017 til 2020 er ætlanin at játta 376 mió. kr. til hetta endamál, harav 83 mió. kr. verða játtaðar í 2017.

Yvir eitt 10 ára skeið frá 2014 til 2024 verða samanlagt játtaðar 400 mió. kr. til almenna partafelagið **P/F Eystur- og Sandoyartunlar**. Í tíðarskeiðinum 2017-2019 verða árliga játtaðar 35 mió. kr. til hesa verkætlan, og síðani verður árliga játtanin 50 mió. kr. í fimm fylgjandi ár.

Til verkætlanina **Talgildu Føroyar** verða í 2017 og komandi fýra árini játtaðar 20 mió. kr. um árið.

Frá 2017 til 2020 verða árliga játtaðar 15 mió. kr. til **bygging ella útvegan** av bústøðum innan almannamál – samanlagt 60 mió. kr.

Til **Vegagerð og havnir** verða játtaðar 17 mió. kr. í 2017. Harundir eru millum annað vegagerð í Kalsoy, trygging av farleiðini til Dals og dagføring av brúm og tunlum.

Til **dokking og viðlíkahald av skipum** verða í 2017 játtaðar 12,5 mió. kr. og 10 mió. kr. í 2018.

Í 2017 verða játtaðar 10 mió. kr. til bygging av nýggjum **Havrannsóknarskipi**. Í 2018-2019 verða samanlagt játtaðar 192 mió. kr. afturat til hetta endamál.

Í 2017 verða játtaðar 8 mió. kr. til **Fróðskaparsetur Føroya og lestrarbústaðir**. Henda játtanin verður fylgjandi árini 10 mió. kr. Játtanin er ætlað til menning av lestrarbýi á Frælsinum í Tórshavn – harundir dagføring av bygninginum á Frælsinum og til lutvíst at fíggja bygging av lestrarbústøðum hjá Bústaðir í hesum sambandi.

Aðrar løgur eru millum annað **Umvæling av almennum bygningum** fyri 22 mió. kr. árliga og **Medicoteknisk tól** á sjúkrahúsunum fyri 9 mió. kr. árliga.

Í 2017 er harafturat ætlanin at selja almennar bygningar fyri 43 mió. kr.

**Løgur í 2018 og frameftir**

Innan mentamál verða árini 2018-2021 játtaðar 60 mió. kr. til **Tjóðleikhús**. Árini 2018-2020 verða raðfestar tilsamans 16 mió. kr. til **nýggjan húsarhaldsskúla í Klaksvík** og 15 mió. kr. til **eftirskúla í Suðuroy**. Frá 2021 til 2023 verða játtaðar 44 mió. kr. til **Søvn Landsins**.

**Hvalbiartunnil** verður raðfestur fyri 163 mió. kr., og eftir hetta verður farið undir **Tunlarnir norður um Fjall**, ið eftir ætlan verða bygdir árini 2021-2024 fyri 205 mió. kr. **Farleiðin til Vestmanna** og **vegurin omanfyri Skálafjørð** verða millum raðfestu løgurnar í løguætlanini frá 2019 og frameftir. Harumframt eru eisini aðrar verkætlanir á samferðsluøkinum.

Leggjast kann afturat, at í 2020-2021 eru eitt nú 11 mió. kr. settar av til **oljutilbúgvingarútgerð**, og eisini eru 5 mió. kr. settar av til íløgur í FarGen.

Aðrar løgur enn omanfyri nevndu verða eisini framdar.

# Fylgiskjal A: Dagførd uppgerð av konjunkturjavnaðum úrsliti fyri almenna geiran

*Metingar av konjunkturjavnaðum úrsliti hjá tí almenna kunnu vera týðandi íkast, tá ið fíggjar- og búskaparpolitikkurin hjá landinum og tí almenna verður lagdur til rættis. Hetta krevur sjálvsagt, at uppgerðirnar verða rætt brúktar og við neyðugum fyrivarnum og saman við øðrum lyklatølum. Tílíkar uppgerðir verða brúktar í øðrum londum, tá ið almenni fíggjar- og búskaparpolitikkurin verður lagdur til rættis. Í frágreiðingini niðanfyri eru dagførdar uppgerðir av konjunkturjavnaðum úrsliti fyri tíðarskeiðið 2001-2016. Mett verður harafturat leysliga um 2017. Árini 2015 til 2017 eru torfør at meta um, av tí at endaligar uppgerðir av almenna búskapinum og tjóðarroknskapur eru ikki tøk fyri árini eftir 2014. Metingarnar fyri árini eftir 2014 eru tískil óvissar og skulu lesast við fyrivarnum.*

## Høvuðsniðurstøður

- Uppgerðirnar benda á, at tað almenna tilsamans hevði konjunkturjavnað hall á umleið 1% av BTÚ bæði í 2015 og 2016
- Hallið svarar til umleið 150 mió. kr. í nútíðarvirði og við støði í mettum BTÚ fyri 2016
- Uppgerðirnar fevna um land, kommunur og sosialar grunnar undir einum
- Til sammetingar høvdu flestu OECD-lond konjunkturjavnað hall á 1-3% av BTÚ í 2015
- Síðstu árini stavar størsti parturin av konjunkturjavnaða hallinum frá hallinum hjá landinum
- Í 2016 er tó líkt til, at kommunurnar í eins stóran mun hava konjunkturjavnað hall
- Uppgerðirnar benda á, at *lágkonjunkturur* var árini 2009 til 2013 og *normalkonjunkturur* í 2014 og at *hákonjunkturur* var í 2015 og aftur í 2016
- Uppgerðirnar benda á, at skal bygnaðarliga hallið fáast burtur, verður neyðugt at seta í verk varandi tiltøk á inntøku- og útreiðslusíðuni hjá tí almenna á 40-50 mió. kr. árliga frá 2017 til 2019
- Fyri haldførið í almenna búskapinum er umráðandi, at tiltøk verða sett í verk, sum betra javnvágina millum almennar inntøkur og útreiðslur - serliga um hugsað verður um tær broytingar í aldurssamanseting, sum eru væntandi næstu árini
- Uppgerðirnar leggja ikki upp fyri, at tað almenna frá 2012 bæði hevur skattað privat pensjónsinngjøld og pensjónsútgjøld. Hetta ávirkar roknaða haldførið hjá tí almenna við umleið 300 mió. kr.
- Langtíðarhaldførið í almenna búskapinum er tí í øllum førum 300 mió. kr. verri, enn hesar uppgerðir benda á, umframt væntaðar broytingar í fólkasamanseting næstu árini

## Inngangur

Fíggjarmálaráðið metti fyrstu ferð í februar 2014 um konjunkturjavnaða úrslitið hjá tí almenna tilsamans (bygnaðarliga hallið ella *Cyclically Adjusted Budget Balance*). Niðanfyri eru dagførdar uppgerðir fyri tíðarskeiðið 2001-2016, og mett verður leysliga um 2017. Eins og greitt varð frá í frágreiðingini um konjunkturjavnaða úrslitið frá februar 2014, eru ikki øll hagtøl tøk í Føroyum, sum vanliga verða brúkt til tílíkar uppgerðir. Tí er óvissan stór um tílíkar uppgerðir av tí almenna í Føroyum, og tær skulu lesast við fyrivarni og saman við øðrum hagtølum.

Uppgerðarhátturin, sum verður brúktur her, er meinlíkur uppgerðarháttum, sum danska Finansministeriet og OECD áður hava brúkt. Metingar av konjunkturjavnaða úrslitinum fyri almenna geiran kunnu vera týðandi íkast, tá ið fíggjar- og búskaparpolitikkurin hjá landinum verður lagdur til rættis. Hetta krevur sjálvsagt, at uppgerðirnar verða brúktar rætt og við neyðugum fyrivarnum og saman við øðrum lyklatølum og ábendingum um almenna búskapin og um búskapin sum heild.

Konjunkturjavnaða úrslitið gevur ábendingar um, hvat úrslitið fyri almenna geiran hevði verið, um vit javna fyri ávirkanir frá konjunkturstøðu á búskapin og serliga á almenna búskapin. Uppgerðirnar siga sostatt, hvat almenna úrslitið hevði verið, um *normalkonjunkturur* var í samfelagnum eitt ávíst tíðarskeið. Hetta úrslitið verður nevnt *konjunkturjavnað úrslit* fyri almenna geiran.

## Dagførdar uppgerðir av konjunkturjavnaðum úrsliti

Uppgerðir av konjunkturjavnaðum úrsliti fyri tað almenna fevna um almenna geiran sum heild, t.e. land, kommunur og sosialar grunnar undir einum.

Í talvu A1 og myndunum A1-A4 eru uppgerðirnar av konjunkturjavnaðurm úrsliti fyri almenna geiran vístar. Tað er umráðandi at gera greitt, at uppgerðirnar eru óvissar serliga í endanum og byrjanini á tíðarrøðini. Hetta merkir til dømis, at óvissan er størri í uppgerðunum fyri 2016 og 2017 enn fyri 2010. Uppgerðirnar skulu tí lesast við fyrivarnum og ikki ov bókstavliga, men kunnu saman við øðrum vísitølum geva ábendingar um støðuna og haldførið í almenna búskapinum sum heild og serliga yvir longri áramál.

Talva A1 vísir, at sambært uppgerðunum hevði tað almenna konjunkturjavnað hall í 2015 á umleið 1% av BTÚ. Uppgerðirnar benda sostatt á, at tað almenna í 2015 hevði konjunkturjavnað hall á umleið 150 mió. kr. við støði í mettum BTÚ fyri 2015.

**Talva A1 Konjunkturjavnað úrslit fyri almenna geiran**

| | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014* | *2015** | *2016** | *2017** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Tað almenna tilsamans** (*í % av BTÚ*) | | | | | | | | | | | | | | |
| Staðfest alment úrslit (a) | -2,3 | -1,8 | 2,0 | 2,1 | -2,8 | -4,8 | -3,5 | -2,1 | -2,1 | -2,5 | -1,6 | *-0,1* | *0,1* | *0,2* |
| Ískoyti frá konjunkturstøðu (b) | -0,3 | -0,5 | 1,6 | 1,4 | -0,9 | -1,3 | -0,5 | -1,2 | -2,0 | -0,8 | 0,0 | *1,1* | *1,2* | *0,7* |
| Konjunkturjavnað úrslit (c = a-b) | -2,0 | -1,3 | 0,4 | 0,7 | -1,9 | -3,5 | -3,0 | -0,9 | -0,1 | -1,7 | -1,6 | *-1,2* | *-1,1* | *-0,5* |
| Konjunkturfrávik | -1,0 | -2,0 | 6,2 | 5,2 | -3,4 | -5,1 | -1,7 | -4,5 | -7,5 | -2,9 | 0,0 | *4,0* | *4,3* | *2,5* |

* Uppgerðirnar fyri 2014-2016 eru grundaðar á, at hallið í almenna geiranum tilsamans verður mett til umleið 1,5% av BTÚ í 2014, og at hallið var burtur í 2015.
Tølini fyri 2015 til 2017 eru óvissar metingar og skulu lesast við fyrivarni.
Kelda: Fíggjarmálaráðið.

Talva A2 vísir uppgerðir hjá IMF yvir konjunkturjavnað úrslit fyri tað almenna býtt á útvald lond og ár. Í talvu A2 sæst, at flestu stóru lond í Vesturheiminum høvdu konjunkturjavnað hall í 2015, sum var ájavnt við ella størri sammett við hallið í Føroyum.

**Talva A2 Konjunkturjavnað úrslit fyri almenna geiran býtt á lond**

| | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | *2016** | *2017** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Tað almenna tilsamans** (*í % av BTÚ*) | | | | | | | | | | | | |
| Danmark | 3,3 | 3,3 | 1,6 | -1,9 | -1,7 | -1,3 | -2,7 | 0,0 | 2,5 | -2,4 | *-2,7* | *-2,6* |
| Ísland | 4,3 | 2,8 | -4,4 | -10,0 | -7,6 | -4,6 | -2,8 | -1,3 | -0,1 | 1,0 | *-0,1* | *0,7* |
| Týskland | -1,6 | -0,9 | -1,1 | -0,9 | -3,4 | -1,4 | -0,1 | 0,4 | 0,4 | 0,5 | *0,2* | *0,2* |
| USA | -3,2 | -4,0 | -5,9 | -7,6 | -9,4 | -8,1 | -6,2 | -4,1 | -3,6 | -3,1 | *-3,0* | *-3,0* |
| Stóra Bretland | -4,7 | -5,4 | -6,7 | -9,7 | -8,0 | -5,8 | -5,6 | -3,6 | -4,3 | -3,6 | *-2,5* | *-1,5* |
| Evruøkið tilsamans | -2,0 | -2,0 | -3,2 | -4,5 | -4,8 | -3,7 | -2,5 | -1,3 | -1,1 | -1,0 | *-1,0* | *-0,8* |
| Føroyar | 0,4 | 0,7 | -1,9 | -3,5 | -3,0 | -0,9 | -0,1 | -1,7 | -1,6 | -1,2 | *-1,1* | *-0,5* |

Kelda: IMF. Fiscal Monitor, september 2015. Tølini fyri 2016 og 2017 eru óvissar metingar og skulu lesast við fyrivarni.

Á myndunum A1 og A2 sæst, at eftir valda uppgerðarháttinum var *lágkonjunkturur* í Føroyum frá 2009 til 2013, og at *normalkonjunkturur* var í 2014. Uppgerðirnar benda eisini á, at *hákonjunkturur* var

í 2015 og aftur í 2016. Á mynd A3 sæst, at konjunkturjavnaða hallið minkaði úr umleið 3% í 2010 til nærum javnvág í 2012. Síðani er konjunkturjavnaða hallið vaksið nakað aftur. Orsøkin til, at hallið er vaksið frá 2013 er, at konjunkturstøðan er batnað munandi síðani 2013, meðan almenna úrslitið ikki í sama mun er batnað, hóast úrslitið er betrað nakað síðani 2013.

**Myndir A1-A4. Konjunkturjavnað framleiðsla og konjunkturjavnað úrslit**




Viðm.: Tølini skulu lesast við tí fyrivarni, at HP-filtrið kann vera óneyvt í endanum á tíðarrøðum. T.d. skulu serliga árini 2001-2002 og 2015-2016 lesast við fyrivarni. Havandi fyrivarnini í huga, verður hildið sannlíkt, at konjunkturjavnaða úrsliti fyri tað almenna tilsamans var 1½-2% av BTÚ í 2015, sum svarar til 150-200 mió. kr. í nútíðarvirði og við støði í mettum BTÚ fyri 2015.

[1] Konjunkturfrávikið er munurin millum staðfesta framleiðsu (í hesum føri bruttovirðisøking) og konjunkturjavnaða framleiðslu í % av konjunkturjavnaðari bruttovirðisøking.

[2] Grundrakstur er í hesum føri almenna úrslitið frádrigið rentur, vinningsbýti og ognarútreiðslur.

Kelda: Fíggjarmálaráðið.

## Orðalýsingar

**Almenn nettoskuld**
Almenna nettoskuldin fevnir um alla fíggjarliga skuld og áogn í almenna geiranum. Almenna nettoskuldin er øll fíggjarlig skuld í almenna geiranum frádrigið alla fíggjarliga áogn. Fíggjarliga áognin fevnir millum annað um tøka gjaldførið og aðrar fíggjarognir.

**Almennar útreislur tilsamans**
Størsti parturin av almennu útreiðslunum er almenn nýtsla og veitingar til húsarhald, fyritøkur og feløg. Umleið 85% av almennu útreiðslunum eru almenn nýtsla og veitingar til húsarhald, fyritøkur og feløg. Harafturat eru almennu útreiðslurnar íløgur, rentuútreiðslur, stuðulsútreiðslur og aðrar útreiðslur. Umleið 85% av almennu útreiðslunum eru útreiðslur hjá landi og kommunum.

**Bruttotjóðarúrtøka, stytt BTÚ**
Bruttotjóðarúrtøka er virðið á samlaðari privatari og almennari framleiðslu frádrigið virðið á ráevnum, vørum og tílíkum, sum verða brúkt í framleiðsluni. Verður eisini nevnt *Gross Domestic Product (GDP)* ella *Bruttonationalprodukt (BNP)*.

**Bruttotjóðarúrtøka í føstum prísum**
Bruttotjóðarúrtøka í føstum prísum er uppgerð av BTÚ, har ið roynt verður at javna gongdina í BTÚ fyri prísvøkstri á ráevnum, vørum og tænastum. Vøksturin í BTÚ í føstum prísum verður vanliga brúktur sum vísital fyri búskaparvøkstur millum lond. Vøkstur í BTÚ í føstum prísum vísir vøkstur í framleiðsluni í mongdum. Verður nevnt *Real GDP* ella *realt BNP*.

**Bruttovirðisøking, stytt BVØ**
Bruttovirðisøking er bruttotjóðarúrtøka frádrigið vøruskattir netto, sum fevna um meirvirðisgjald, punktgjøld og aðrar vøruskattir og vørustudningar. Bruttovirðisøking verður ofta brúkt til at lýsa framleiðsluna býtta á vinnugreinar. Verður nevnt *Gross Value Added (GVA)* ella *Bruttoværditilvækst (BVT)*.

**Fíggjarpolitiskt haldføri**
At fíggjar- og búskaparpolitikkurin er haldførur merkir, at rikni politikkurin hongur saman yvir longri áramál skilt soleiðis, at gongdin í almennu nettoskuldini sum partur av samfelagsbúskapinum er støðug yvir tíð. Hetta merkir, at almennu inntøkurnar kunna fíggja almennu útreiðslurnar og rentuútreiðslur av verandi almennari skuld yvir tíð. Fíggjar- og búskaparpolitikkurin kann sostatt vera haldførur yvir longri áramál, hóast tað almenna hevur hall í fleiri ár, um bara almenna nettoskuldin ikki er støðugt vaksandi partur av samfelagsbúkapinum yvir tíð.

**Konjunkturjavnað alment úrslit**
Konjunkturjavnaða almenna úrslitið er staðfest alment úrslit javnað fyri ávirkanir frá konjunkturstøðuni á almennar inntøkur og útreiðslur og aðrar ikki varandi og serliga umstøður, til dømis oljuprísir ella serligar íløgur.
Konjunkturjavnaða almenna úrslitið gevur sostatt eina meira rættvísandi mynd av veruligu gongdini í almenna búskapinum sum heild sammett við staðfesta almenna úrslitið.
Konjunkturjavnaða úrsliti hjá tí almenna verður aðrastaðni vanliga nevnt *Cyclically Adjusted Budget Balances* ella *strukturel saldo*.

**Konjunkturjavnað framleiðsla**

Konjunkturjavnað framleiðsla vísir mettu bruttotjóðarúrtøkuna í eini støðu, har ið roynt verður at javna fyri ávirkanir frá konjunkturunum í samfelagsbúskapinum. Roynt verður sostatt at vísa bruttotjóðarúrtøkuna í eini støðu við normalkonjunkturi í samfelagnum. Í eini støðu við normalkonjunkturi verður ofta sagt, at gongdin í samfelagsbúskapinum samsvarar við javnan vøkstur í prísum og lønum. Í frágreiðingini verður bruttovirðisøking brúkt sum vísital fyri framleiðslu heldur enn bruttotjóðarúrtøku, men hetta hevur ikki stóran týdning fyri úrslitini ella niðurstøður. Verður vanliga nevnd *potential output, potential GDP* ella *strukturelt/potentielt output (BNP).*

**Konjunkturfrávik**

Konjunkturfrávikið er munurin millum staðfesta framleiðslu og konjunkturjavnaða framleiðslu. Er konjunkturfrávikið størri enn 0, kunnu vit siga, at hákonjunkturur er í samfelagsbúskapinum; trýst er sum oftast á arbeiðsmarknaðinum, lítið av tøkari framleiðsluorku er í samfelagnum, og prísvøkstur er á flestu marknaðum. Er konjunkturfrávikið minni enn 0, kunnu vit siga, at lágkonjunkturur er í samfelagnum, lítið trýst er á arbeiðsmarknaðinum, og tøk framleiðsluorka er í samfelagnum. Konjunkturfrávik verður aðrastaðni ofta nevnt *outputgap* ella *outputgab*.

**Landskassaskuld**

Landskassaskuldin fevnir bara um skuld hjá landinum og harvið ikki um skuld hjá kommunum ella sosialum grunnum. Meginparturin av landskassaskuldini er lánsbrævalán. Landskassaskuldin er sum oftast ein bruttouppgerð av skuldini, har dentur verður lagdur á fíggjarligu skyldurnar hjá landinum (passivsíðuna á fíggjarjavnanum).

**RLÚ-úrslit**

Stytting fyri rakstrar-, løgu- og útlánsúrslit landskassans. RLÚ-úrslitið er munurin millum landskassans inntøkur og útreiðslur uppgjørt eftir meginreglunum í landsroknskapinum. RLÚ-úrslitið viðvíkur roknskapinum hjá landskassanum.

**Sosialir grunnar**

Hesir eru Arbeiðsloysisskipanin, Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin, Barsilsskipanin og Heilsutrygd.

**Staðfestur almennur grundrakstur**

Staðfestur almennur grundrakstur verður í hesum føri lýstur sum staðfest alment úrslit frádrigið nettorentuútreiðslur (rentuútreiðslur minus rentuinntøkur). Verður vanliga nevnt *General Government Primary Balance* ella *faktisk primær saldo.*

**Staðfest alment úrslit**

Almenna úrslitið vísir avlop ella hall hjá tí almenna og verður lýst sum munurin millum almennar inntøkur og útreiðslur. Uppgerðin fylgir teimum leiðreglum, sum tjóðarroknskapurin verður uppgjørdur eftir. Tað almenna fevnir um heimastýrisfyrisitingina, kommunufyrisitingina, ríkisfyrisitingina og sosialar grunnar. Verður vanliga nevnt *General Government Overall Balance* ella *faktisk offentlig saldo.*

**Staðfest framleiðsla**
Virðið á vørum og tænastum frá marknaðarligari framleiðslu, framleiðslu til egna nýtslu og aðrari framleiðslu, sum ikki er marknaðarlig. Framleiðsla er ikki tað sama sum søla. Til dømis er framleiðsluvirðið í handilsvirki ikki sølan, men sølan minus innkeyp av handilsvørum (bruttovinningur). Í frágreiðingini verður bruttovirðisøkingin úr tjóðarroknskapinum nýtt sum vísital fyri framleiðslu. Bruttovirðisøking ella bruttotjóðarúrtøka verða sum oftast brúkt sum vísitøl fyri framleiðslu. Verður vanliga nevnt *Actual Output* ella *faktisk produktion*.

**Tað almenna**
Tað almenna fevnir um heimastýrisfyrisitingina, kommunufyrisitingina, ríkisfyrisitingina og sosialar grunnar. Heimastýrisfyrisitingin fevnir um landsstovnar, meðan kommunufyrisitingin fevnir um kommunurnar og kommunustovnar. Ríkisfyrisitingin fevnir um donsku ríkistovnarnar í Føroyum, og sosialu grunnarnir eru Arbeiðsloysisskipanin, Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin, Barsilsskipanin og Heilsutrygd.

## Bókmentir

[1] Danmarks Nationalbank. Beregning af produktionsgab. Kvartalsoversigt, 4. kvartal 2015. Troels Kromand Danielsen og Casper Winther Jørgensen. Bls. 65-78. Tøkt á http://www.nationalbanken.dk/da/publikationer/Documents/2015/12/Beregning_af_produktionsgab.pdf.

[2] De Økonomiske Råd. Alternativ beregning af strukturel arbejdsstyrke. Tøkt á http://www.dors.dk/Konjunkturvurdering_og_Offentlige_finanser_-_En_prognoseopdatering, februar 2016.

[3] De Økonomiske Råd. Dansk Økonomi Efterår 2015. Tøkt á http://www.dors.dk/vismandsrapporter/dansk-oekonomi-efteraar-2015, september 2015.

[4] De Økonomiske Råd. Der er betydelig usikkerhed om den strukturelle saldo. Børsen, 12. oktober 2015. Tøkt á http://www.dors.dk/oevrige-publikationer/kronikker-artikler/betydelig-usikkerhed-strukturelle-saldo.

[5] De Økonomiske Råd. Konjunkturvurdering og Offentlige finanser. En prognoseopdatering, 10 februar 2016. Tøkt á http://www.dors.dk/Konjunkturvurdering_og_Offentlige_finanser_-_En_prognoseopdatering, februar 2016.

[6] Finansministeriet. Beregning af den strukturelle offentlige saldo. Arbejdspapir nr. 17/2005. Tøkt á http://www.fm.dk/publikationer/arbejdspapirer/2005/arbejdspapir-nr,-d-,-17-2005/~/media/Files/Arbejdspapirer/arbpap1705.ashx, 2005.

[7] Finansministeriet. Opdatering af finansministeriets beregning af konjunkturgab og strukturelle niveauer. Tøkt á http://www.fm.dk/oekonomi-og-tal/finansministeriets-regnemetoder.

[8] Finansministeriet. Opdatering af metoden til beregning af strukturel saldo. Tøkt á http://www.fm.dk/oekonomi-og-tal/finansministeriets-regnemetoder.

[9] Grønlands Økonomiske Råd. Økonomisk Råds rapport, 2011. Tøk á http://naalakkersuisut.gl/~/media/Nanoq/Files/Attached%20Files/Finans/DK/Oekonomisk%20raad/100913Oekonomisk_Raads_Rapport_2013_DK%20(1).pdf.

[10] IMF. Fiscal Monitor. The Commodities Roller Coaster. A Fiscal Framework for Uncertain Times, October 2015. Frágreiðing tøk á http://www.imf.org/external/pubs/ft/fm/2015/02/fmindex.htm, 2015.

[11] OECD. Economics Department Working Paper No. 434, Measuring cyclically-adjusted budget balances for OECD countries, 2005. Tøkt á http://www.oecd-ilibrary.org/docserver/download/5lgpfmjmgp6k.pdf?expires=1383836537&id=id&accname=guest&checksum=4D7141E26B939DD3CE4F64D89EC58033.

[12] OECD. OECD Economic Outlook, Vol. 2008/1, OECD Publishing. Frágreiðing tøk á http://www.oecd-ilibrary.org/economics/oecd-economic-outlook-volume-2008-issue-1_eco_outlook-v2008-1-en, 2008.

[13] Rådgivende udvalg vedrørende Grønlands Økonomi. Den Økonomiske udvikling i Grønland. Frágreiðing tøk á http://www.stm.dk/publikationer/groenland03/default.htm, 2003.

[14] Økonomi og Indenrigsministeriet. Økonomisk Redegørelse, August 2013. Bls. 155-178. Tøkt á oim.dk/media/510019/%C3%98konomisk%20Redeg%C3%B8relse%20august%202013.pdf.